# Uttanríkis- og mentamálaráðið

| | |
|---|---|
| Dagfesting: | 11. oktober 2022 |
| Mál nr.: | Skrivið her |
| Málsviðgjørt: | AW/KJ |
| Ummælistíð: | Skrivið frá/til |
| Eftirkannað: | Lógartænastan dagfestir |

**Uppskot til**

**Løgtingslóg**
**um**
**bókasøvn**
(Bókasavnslógin)

## Kapittul 1
## Endamál og virkisøki

**§ 1.** Bókasøvn, ið virka sambært hesi løgtingslóg, skulu veita fría og ókeypis atgongd til upplýsing, lærdóm og mentan. Bókasøvn skulu stimbra fólkaræðisliga rættin at taka lut í samfelagnum og at mennast, hugsa, tosa og skriva frítt eins og tey tryggja mentanararvin, ið bókasøvnini varða av.
*Stk. 2.* Til endamálið hava bókasøvnini til taks bøkur og annað tilfar, ið stimbrar lesihug og er viðkomandi, dygdargott og fjølbroytt. Hugsjónarlig, politisk og átrúnaðarlig sjónarmið ella handilslig áhugamál mugu ikki ávirka útboðið av tilfarinum.

**§ 2.** Løgtingslógin fevnir um alment fíggjað bókasavnsvirksemi, sum land ella kommunur varða av, og fevnir um virksemi á:
1) Fólkabókasøvnum, sbr. §§ 5-10
2) Skúlabókasøvnum, sbr. §§ 11-14
3) Bókasøvnum á hægri útbúgvingarstovnum, sbr. §§ 15-16
4) Landsbókasavninum, sbr. §§ 17-21
5) Øðrum heilt ella lutvíst alment fíggjaðum bókasøvnum.

## Kapittul 2
## Skipan

**§ 3.** Bókasøvn, ið virka sambært løgtingslógini, mynda bókasavnskervi landsins og skulu taka lut í samstarvi millum bókasøvn, ið Landsbókasavnið skipar fyri.
*Stk. 2.* Bókasøvnini skulu vera partur av bókasavnsskipan, ið Landsbókasavnið hevur góðkent.

*Stk. 3.* Bókasøvnini skulu innganga í felags lánisamstarv millum bókasøvn, bæði innanlands og uttanlands.
*Stk. 4.* Landsstýrismaðurin kann geva kommunum og stovnum nærri boð um skyldurnar í stk. 1-3.

**§ 4.** Landsstýrismaðurin skipar eitt bókasavnsráð at ráðgeva politisku skipanini í bókasavnspolitiskum og bókasavnsfakligum málum og at gera tilmæli um menning og samskipan av bókasavnsøkinum.
*Stk. 2.* Landsstýrismaðurin ásetur nærri reglur um, hvussu bókasavnsráðið verður skipað.

## Kapittul 3
## Fólkabókasøvn

**§ 5.** Fólkabókasøvn skulu fremja upplýsing, lærdóm, talgilda búgving og luttøku í mentanarlívinum og samfelagnum sum heild. Hetta verður gjørt við at veita atgongd til og miðla dygdargóðar og fjølbroyttar bókmentir, greinar, almenna kunning, film, tónleik, myndlist og annað tilfar á viðkomandi miðlum.
*Stk. 2.* Øll skulu hava atgongd til øll fólkabókasøvn í landinum.
*Stk. 3.* Fólkabókasøvnini skulu serliga leggja seg eftir at fremja lesing og áhuga fyri bókmentum.
*Stk. 4.* Fólkabókasøvnini skulu raðfesta tilfar, ið kann fremja málmenning og stimbra lesihugin hjá børnum og ungum.
*Stk. 5.* Fólkabókasøvn skulu veita bókasavnstænastur til fólk við serligum tørvi.
*Stk. 6.* Fólkabókasøvn skulu hava til taks bókmentir á fleiri málum.

**§ 6.** Fólkabókasøvn eru kommunalir stovnar, og allar kommunur hava skyldu til at veita fólkabókasavnstænastu, sbr. tó stk. 3.
*Stk. 2.* Fólkabókasøvn skulu hava starvsfólk við hægri bókasavnsfakligari útbúgving í starvi, sbr. tó stk. 3.
*Stk. 3.* Kommunur, ið ikki hava egið fólkabókasavn, ella hava eitt fólkabókasavn, har einki starvsfólk hevur hægri bókasavnsfakliga útbúgving, skulu gera avtalu við aðra kommunu um at veita fólkabókasavnstænastu. Fólkabókasavnið, ið avtala verður gjørd við, skal hava starvsfólk við hægri bókasavnsfakligari útbúgving í starvi.
*Stk. 4.* Kommunustýrið velur eina bókasavnsnevnd, sum hevur ábyrgdina av bókasavnsrakstrinum. Virkisøkið er avvarðandi kommuna ella, um avtala er millum fleiri kommunur um felags bókasavnsrakstur, hesar kommunur.
*Stk. 5.* Eru fólkabókasavnið og skúlabókasavnið í felags høli, skal skúlastýrið vera umboðað í bókasavnsnevndini, sambært stk. 4.
*Stk. 6.* Kommunustýrið ger viðtøkur fyri hvørt fólkabókasavn, og um fólkabókasavnið er felags fyri fleiri kommunur, gera kommunustýrini viðtøkurnar í felag. Viðtøkurnar verða sendar Landsbókasavninum at góðkenna.
*Stk. 7.* Landsstýrismaðurin kann veita kommunum stuðul til rakstur av fólkabókasavnstænastu, sum verður býttur eftir fólkatalinum í einstøku kommununi við ársbyrjan. Landsbókasavnið veitir ráðgeving og hevur eftirlit við stuðlinum.
*Stk. 8.* Landsstýrismaðurin ásetur nærri reglur og treytir fyri stuðulin og býtið av stuðlinum.
*Stk. 9.* Landsstýrismaðurin kann geva kommunum og stovnum nærri boð um skyldurnar í stk. 1-6.

**§ 7.** Fólkabókasøvn skulu hava hóskandi høli, ið Landsbókasavnið hevur eftirlit við.
*Stk. 2.* Eru hølisviðurskiftini ikki hóskandi til bókasavnsvirksemi, kann landsstýrismaðurin eftir tilmæli frá Landsbókasavninum geva kommunum boð um at fáa hølisviðurskiftini í rættlag innan fyri nærri ásetta freist.

**§ 8.** Fólkabókasøvnini samstarva við dagstovnar og ellisheim, umframt aðrar viðkomandi stovnar um at veita bókasavnstænastu.

**§ 9.** Fólkabókasøvn læna út bøkur og annað tilfar í eitt avmarkað tíðarskeið.
*Stk. 2.* Fólkabókasøvn kunnu taka gjald fyri aðrar tænastur, so sum ljóstøk og postgjald.
*Stk. 3.* Fólkabókasøvn kunnu áleggja gjald fyri tilfar, ið ikki verður latið inn aftur til ásettu tíðina.

**§ 10.** Fólkabókasøvn skulu taka lut í bókasavnssamstarvinum fyri fólkabókasøvn, sum Landsbókasavnið skipar fyri.
*Stk. 2.* Landsbókasavnið hevur eftirlit við fólkabókasøvnunum og veitir ráð og leiðbeining.

## Kapittul 4
## Skúlabókasøvn

**§ 11.** Skúlabókasøvn skulu bjóða fram bøkur og annað tilfar og menna førleikar hjá næmingum, ið stuðla undir lívlangari læring, og sum brynja næmingarnar í at handfara upplýsingar á øllum miðlum.
*Stk. 2.*Skúlabókasøvn skulu vera í øllum skúlum.
*Stk. 3.* Skúlabókasøvn kunnu verða skipað saman við einum fólkabókasavni ella einum skúlabókasavni í einum øðrum skúla.
*Stk. 4.* Landsstýrismaðurin góðkennir samstarv millum bókasøvn sambært stk. 3.
*Stk. 5.* Landsbókasavnið ráðgevur og vegleiðir um virksemið hjá skúlabókasøvnunum sambært §§ 11-14.

*Fólkaskúlin*

**§ 12.** Skúlabókasøvnini í fólkaskúlanum eru skipað sambært fólkaskúlalógini.

*Miðnámsskúlar og yrkisskúlar og onnur útbúgvingartilboð*

**§ 13.** Skúlabókasøvn skulu vera í øllum miðnámsskúlum og yrkisskúlum og øðrum skúlum, sum bjóða út útbúgvingar.
*Stk. 2.* Landsstýrismaðurin ásetur nærri reglur um skúlabókasøvn, sum eru skipað sambært stk. 1.

*Frískúlar, eftirskúlar og serskúlar*

**§ 14.** Skúlabókasøvn skulu vera í frískúlum, eftirskúlum og serskúlum, sum bjóða undirvísingartilboð við almennum stuðli.
*Stk. 2.* Landsstýrismaðurin ásetur nærri reglur um skúlabókasøvn, sum eru skipað sambært stk. 1.

## Kapittul 5
## Bókasøvn á hægri útbúgvingarstovnum

*Fróðskaparsetur Føroya*

**§ 15.** Universitetsbókasavnið á Fróðskaparsetri Føroya skal:
1) Tryggja granskarum, undirvísarum og lesandi á Fróðskaparsetri Føroya og øðrum atgongd til tilfar og tænastur, sum er neyðugt í sambandi við gransking og undirvísing og
2) veita atgongd til og miðla ta gransking, ið fer fram á Fróðskaparsetri Føroya.

*Stk. 2.* Avtala verður gjørd millum Fróðskaparsetur Føroya og Landsbókasavnið um rakstur og fígging av universitetsbókasavninum á Fróðskaparsetri Føroya.
*Stk. 3.* Landsstýrismaðurin góðkennir avtaluna um rakstur og fígging av universitetsbókasavninum.

*Aðrir hægri útbúgvingarstovnar*

**§ 16.** Bókasøvn skulu vera á øllum hægri útbúgvingarstovnum.
*Stk. 2.* Hægri útbúgvingarstovnar skulu gera avtalu við Landsbókasavnið um rakstur og fígging av bókasavninum.

*Stk. 3.* Landsstýrismaðurin góðkennir avtalur um rakstur og fígging av bókasøvnum á útbúgvingarstovnum.

## Kapittul 6
## Landsbókasavnið

*Tjóðbókasavn*

**§ 17.** Landsbókasavnið er tjóðbókasavn. Sum tjóðbókasavn
1) savnar, skrásetur, varðveitir og miðlar Landsbókasavnið alt, ið verður givið út av verkum og tilfari, bæði prentaðum og talgildum, á føroyskum, ið vendir sær til fólk í Føroyum ella eftir føroyskar rithøvundar.
2) Savnar, skrásetur, varðveitir og miðlar Landsbókasavnið handrit o.a. eftir føroyskar høvundar og handrit, ið annars lýsa føroyska bókmentasøgu, tónleikasøgu, filmssøgu, mentan og siðsøgu,
3) skipar Landsbókasavnið fyri skráseting av føroysku tjóðbókaskránni og
4) er Landsbókasavnið føroysk ISBN, ISMN og ISSN-skrivstova í sambandi við altjóða skráseting av bókum, tónleiki, filmi og tíðarritum.

*Stk. 2.* Við støði í tí tilfari, sum er til skjals á stovninum, fremur og skipar Landsbókasavnið fyri gransking.
*Stk. 3.* Landsbókasavnið skipar fyri menning á bókasavnsøkinum.

*Universitetsbókasavn*

**§ 18.** Landsbókasavnið er universitetsbókasavn. Sum universitetsbókasavn mennir og veitir Landsbókasavnið universitetsbókasavnstænastur, ið stuðla undir gransking og undirvísing á hægri útbúgvingarstovnum. Landsbókasavnið
1) skipar fyri undirvísing og skeiðsvirksemi fyri granskarum, lærarum, lesandi og øðrum og
2) stuðlar undir lestur og gransking, m.a. við at veita góðar hølisumstøður, lesistovu, lesiklivar og atgongd til tekniska útgerð, sum tørvur er á.

*Vísindabókasavn*

**§ 19.** Landsbókasavnið er vísindabókasavn. Sum vísindabókasavn mennir og veitir Landsbókasavnið vísindabókasavnstænastur, ið stuðla undir gransking á privatum og almennum granskingarstovnum.

*Høvuðsbókasavn*

**§ 20.** Landsbókasavnið er høvuðsbókasavn fyri fólkabókasøvn.
Sum høvuðsbókasavn
1) samskipar Landsbókasavnið keypið av bókum og øðrum tilfari
2) fyrireikar, bindir inn og greiðir Landsbókasavnið hetta tilfar til bókasøvnini,
3) fremur Landsbókasavnið upplýsandi tiltøk um bókasavnstilfar og
4) skipar Landsbókasavnið fyri tænastumenning og førleikamenning á bókasøvnunum.

*Stk. 2.* Eftir tilmæli frá Landsbókasavninum kann landsstýrismaðurin samráðast við eina kommunu um, at eitt fólkabókasavn átekur sær partar av høvuðsbókasavnstænastuni sambært stk.1, nr. 1-4. Fólkabókasøvn, sum skulu røkja høvuðsbókasavnsuppgávu, skulu vera á nøktandi støði í mun til tilfar, starvsfólk, høli og tøkni, so at uppgávurnar kunnu verða røktar á fullgóðan hátt.

**§ 21.** Tann, ið røkir høvuðsbókasavnstænastu, kann taka gjald fyri at veita bókasøvnum høvuðsbókasavnstænastu.
*Stk. 2.* Eftir reglum, ið landsstýrismaðurin ásetur, verður eisini heimilað Landsbókasavninum at reka ávíst inntøkufíggjað virksemi, eitt nú at taka gjald fyri ymiskar tænastur, sum Landsbókasavnið veitir almennum

stovnum, privatum stovnum, granskarum og øðrum.

## Kapittul 7
## Bókasavnsgjaldið

**§ 22.** Landsbókasavnið skipar fyri árliga býtinum av bókasavnsgjaldinum, sum verður at býta til føroyskar rithøvundar og týðarar, hvørs prentaðu og talgildu bøkur, e-bøkur, ljóðbøkur, annað tilfar og týðingar, ið eru til taks á bókasøvnum ella umvegis heimasíður teirra, og til myndlistafólk, tá myndir eru í minsta lagi 40% av bókini ella øðrum tilfari.
*Stk. 2.* Eftirlivandi hjúnafelagi varðveitir rættin til bókasavnsgjald, tó bert um eftirlivandi hjúnafelagi hevur fingið bókasavnsgjald útgoldið áðrenn 1. januar 2023.
*Stk. 3.* Landsstýrismaðurin kann áseta, at bókasavnsgjald, sum er minni enn kr. 500 til hvønn móttakara, ikki verður útgoldið.
*Stk. 4.* Bókasavnsgjald, sum ikki er útgoldið sambært stk. 3, verður lagt afturat bókasavnsgjaldinum sambært stk. 1.
*Stk. 5.* Landsstýrismaðurin kann áseta nærri reglur um býtið av bókasavnsgjaldinum og treytir fyri at móttaka bókasavnsgjald.

## Kapittul 8
## Ljóðbókatænasta

*Útvegan til blind, sjónveik og onnur, ið ikki eru før fyri at lesa prentaðan tekst*

**§ 23.** Landsbókasavnið skal útvega ljóðbøkur og annað tilfar til teirra, sum av eini ella aðrari orsøk ikki fáa lisið vanligan tekst.
*Stk. 2.* Tilfar fevnt av stk. 1 verður lænt út eftir somu ásetingum, sum nevndar eru í § 9, stk. 1.
*Stk. 3.* Landsbókasavnið kann til endamálið sambært stk. 1 framleiða ljóðbøkur o.a. tilfar treytað av, at nevnda tilfar ikki er framleitt ella er í umbúnað at verða framleitt av øðrum, og um avtala er fingin í lag við rættindahavara.

*Útgáva til almenningin*

**§ 24.** Ljóðbøkur og annað tilfar, sum Landsbókasavnið hevur útvegað ella framleitt sambært § 23, kann, við útgávu til almenningin fyri eyga, verða selt rættindahavarum.
*Stk. 2.* Søluprísurin er kostnaðurin, ið Landsbókasavnið hevur rindað fyri at framleiða ljóðbókina ella annað tilfar, og keyparar avdraga kostnaðin árliga við at rinda Landsbókasavninum
50% av inntøkunum, ið rættindahavari hevur av einstøku ljóðbókini ella øðrum tilfari, til framleiðslukostnaðurin er rindaður, tó í mesta lagi í 10 ár, treytað av, at útgávan er tøk fyri almenningin alt tíðarskeiðið.
*Stk. 3.* Landsbókasavnið kann, í tann mun ljóðbøkur og annað tilfar, ið er framleitt eftir ásetingini í § 23, ikki er givið út ella ikki er í umbúnað at verða útgivið til almenningin av øðrum forlagi, geva ljóðbókina og annað tilfar út til almenningin, treytað av, at avtala er fingin í lag við rættindahavara.

## Kapittul 9
## Skylduavhending

**§ 25.** Skylduavhendingin skal vera partur av støðinum undir okkara felags mentanararvi. Avhendingin skal tryggja, at vitanin um føroyska mentan, søgu og føroyskt samfelagslív verður varðveitt til gagns fyri gransking og almenningin yvirhøvur.
*Stk. 2.* Skylduavhendingin skal tryggja støðið undir tjóðbókaskránni, so at henda verður so fullfiggjað sum gjørligt.

**§ 26.** Skylduavhendingin fevnir um øll verk, ið verða útgivin í Føroyum og útgivin uttanlands við útbreiðslu í Føroyum fyri eyga, bæði fysisk verk og talgild verk.

*Stk. 2.* Eitt verk er útgivið, tá ið upphavsmaður hevur givið samtykki til, at eintøk av verkinum verða boðin til sølu ella á annan hátt spjadd alment.

**§ 27.** Við verk er at skilja ein avmarkað mongd av upplýsingum, sum er at meta sum ein liðug og sjálvstøðug eind. Skyldan er galdandi uttan mun til í ella á hvørjum miðli verkið fyriliggur.
*Stk. 2.* Landsstyrismaðurin ásetur nærri reglur fyri, hvørji verk eru fevnd av skylduavhendingini, og hvussu avhendingin fer fram.

**§ 28.** Vísindaligar útgávur, ið eru tengdar at føroyskum granskingarstovnum, eru eisini fevndar av avhendingarskylduni.

*Fysisk verk*

**§ 29.** Av øllum fysiskum verkum skulu avhendast 4 ókeypis eintøk til Landsbókasavnið.
*Stk. 2.* Landsbókasavnið kann í ávísum førum gera frávik frá avhendingarskylduni, serliga í førum, har tað snýr seg um ávís sløg av verkum, eitt nú tílík, ið gjørd verða í fáum eintøkum.

**§ 30.** Avhendingarskyldan áliggur í fyrsta lagi tí, sum framleiðir liðug eintøk til útgávu, og í øðrum lagi útgevaranum, og í triðja lagi innflytaranum av útgávuni.
*Stk. 2.* Tá talan er um útgávu, har eintøkini eru framleidd uttanlands, hevur innflytarin avhendingarskyldu.
*Stk. 3.* Tann, ið hevur avhendingarskylduna, ber allan kostnaðin av útreiðslum av skylduavhendingini.

*Talgild verk*

**§ 31.** Talgild verk, sum skulu avhendast til Landsbókasavnið, fevna um
1) tilfar, ið er útgivið í Føroyum, ella
2) tilfar, ið vendir sær til fólk í Føroyum.
*Stk. 2.* Landsbóksavnið ber kostnaðin av at avrita talgilt tilfar í sambandi við skylduavhendingina.

**§ 32.** Tá talan er um tilfar, ið verður almannakunngjørt frá økisnøvnum og líknandi, ið eru tillutað Føroyum, hevur tann avhendingarskylduna, ið hevur skrásett økisnavnið, har tilfarið er almannakunngjørt.

**§ 33.** Tann, ið hevur avhendingarskyldu, skal geva Landsbókasavninum loyniorð ella aðrar upplýsingar, ið eru neyðugar fyri at fáa atgongd til tilfarið.
*Stk. 2.* Tann, ið hevur avhendingarskyldu, kann krevja, at Landsbókasavnið ikki letur hesar upplýsingar til óviðkomandi triðjamann.

**§ 34.** Eru verk bara atgeingilig um serlig tøknilig útgerð verður nýtt, skal neyðuga nýtsluleiðbeiningin vera hjáløgd, tá avhendað verður. Tá ið talgild verk verða útgivin við serligum útbúnaði, skal tann, ið hevur avhendingarskylduna, avhenda tøkniligt skjalprógv, sum er neyðugt, fyri at verkið skal gerast atgeingiligt.
*Stk. 2.* Tann, ið avhendar, kann krevja, at tøkniliga tilfarið ikki verður atgeingiligt hjá óviðkomandi triðjamanni.

**§ 35.** Tann, ið umsitur økisnøvn og líknandi, ið eru tillutað Føroyum, skal geva Landsbókasavninum talgilt avrit av yvirlitinum yvir slík økisnøvn, umframt upplýsingar um, hvør hevur skrásett økisnøvnini.

*Felags ásetingar*

**§ 36.** Verkini skulu avhendast í tí sniði, sum tey eru útgivin í.
*Stk. 2.* Avhendingarskyldan fevnir eisini um nýggjar útgávur av einum verki.

**§ 37.** Í øllum verkum, útgivnum í Føroyum, skal útgevarin seta navn sítt, ella navn á fyritøku og heimstaði.
*Stk. 2.* Útgevarin hevur skyldu til at veita upplýsingar, sum eru neyðugar fyri, at verkið kann verða skrásett á rættan hátt í tjóðbókaskránni.

**§ 38.** Um tann, ið hevur avhendingarskyldu, doyr ella fer á húsagang, liggur avhendingarskyldan á búnum.

*Varðveiting av skylduavhendum verkum*

**§ 39.** Verk, ið eru skylduavhend, skulu varðveitast á tveimum ymiskum plássum í Føroyum, á Landsbókasavninum og øðrum staði, ið landsstýrismaðurin góðkennir.
*Stk. 2.* Landsstýrismaðurin ásetur nærri reglur fyri varðveiting av verkunum og atgeingi til hetta.

## Kapittul 10

*Vernd av mentanararvi*

**§ 40.** Bøkur, handrit og onnur verk, ið eru privat ella almenn ogn, eldri enn 100 ár, eru at meta sum mentanargripir og mega ikki flytast úr landinum uttan við serligum loyvi frá landsstýrismanninum eftir tilmæli frá Landsbókasavninum.
*Stk. 2.* Landsbókasavnið kann, við góðkenning frá landsstýrismanninum nokta útflutning av sera merkisverdum verkum, ið eru yngri enn tilskilað í stk. 1.

## Kapittul 11

*Skilhaldsreglur*

**§ 41.** Bókasøvn, sum eru fevnd av hesi lóg, kunnu gera reglur um skilhald fyri bókasavnið.

*Revisásetingar og gildiskoma*

**§ 42.** Brot á § 27, stk. 2, § 29, stk. 1, § 33, stk. 1, 34, stk. 1, § 36, stk. 1, § 37 og § 40, stk. 1 verða revsað við sekt.
*Stk. 2.* Brot á reglur, sum eru ásettar við heimild í § 27, stk. 2, kunnu revsast við sekt.
*Stk. 3.* Løgfrøðiligir persónar koma undir revsiábyrgd sambært kapitli 5 í revsilógini.

**§ 43.** Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.
*Stk. 2.* Samstundis fer úr gildi løgtingslóg nr. 31 frá 8. mai 2001 um bókasøvn, sum broytt við løgtingslóg nr. 148 frá 20. desember 2005.

## Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

### 1.1. Orsakir til uppskotið

Í mars 2020 setti Jenis av Rana, landsstýrismaður í uttanríkis- og mentamálum, ein arbeiðsbólk at skriva álit um dagføring av bókasavnslógini. Arbeiðssetningurin var at lýsa nærri tey øki í bókasavnslógini, har tørvur var á at dagføra verandi løggávu, við serligum atliti at:

- Ásetingum um universitetsbókasavn
- Áseting av minstamarki fyri útgjaldi av bókasavnsgjaldinum
- Dagføring av stuðulsskipanunum
- Høvuðsbókasavnsuppgávnuni
- Talgildum tilfari

Arbeiðsbólkurin handaði landsstýrismanninum álit um dagføring av bókasavnslógini tann 17. september 2020. Dagføringarnar, ið arbeiðsbólkurin skeyt upp, tóku støði í tí arbeiði og teimum álitum, ið áður eru gjørd á bókasavnsøkinum, eins og íblástur var fingin úr bókasavnsløggávu í fleiri Norðurlondum. Bókasavnsmanifestini hjá UNESCO/IFLA (United Nations Educational, Scientific and Cultural Organisation/International Federation of Libraries Assocations) vórðu nýtt sum leiðreglur fyri arbeiðinum.

Niðurstøðan hjá arbeiðsbólkinum var, at stóru broytingarnar, sum eru farnar fram í samfelagnum síðani aldarskiftið - ikki minst á útbúgvingarøkinum, á samskiftisøkinum og á tøkniliga økinum - seta alt størri krøv til tænastuveitingarnar á bókasavnsøkinum. Tørvur er tí á umfatandi broytingum í bókasavnslógini.

### 1.2. Galdandi løggáva

Fyrsta løgtingslógin á bókasavnsøkinum, løgtingslóg um landsbókasavn, kom í gildi í 1952. Løgtingslógin hevði ásetingar um landsbókasavn, um skylduavhending og um studning til bókasøvn.

Í 1968 kom løgtingslóg um fólkabókasøvn. Í hesum tíðarskeiði vórðu fleiri nýggj fólkabókasøvn sett á stovn. Lógin hevði ásetingar um, at landið rindaði 60 % av rakstrarútreiðslunum hjá fólkabókasøvnum og lat 50 % í byggistudningi. Í lógini um fólkabókasøvn var eisini ein áseting um studning til rithøvundar, ið skriva á føroyskum.

Við løgtingslóg um megin-, fólka- og skúlabókasøvn frá 1988 varð ásetingin um studning til rithøvundar broytt til eina áseting um bókasavnsgjald til rithøvundar svarandi til 8 % av samlaðu játtanini til bókasøvn.

Nýggja lógin skipaði landið í 7 meginbókasavnsdømi við hvør sínum væl útbygdum fólkabókasavni. Eisini vóru ásetingar um eitt bókasavnsráð og um skipan av eini bókastovu, staðsett í Norðstreymoy, sum skuldi veita bókasavnstænastur til fólkabókasøvnini, skipa fyri skeiðsvirksemi og býta út bókasavnsgjaldið. Framsøkna ætlanin um at skipa landið við meginbókasøvnum, varð tó ongantíð veruleiki, og ætlanin um at skipa bókastovu í Norðstreymoy varð heldur ikki framd. Í seinni lógarbroyting vórðu hesar uppgávur lagdar til Landsbókasavnið.

Skúlabókasøvnini, sum longu í 1979 vórðu umrødd í fólkaskúlalógini, fingu sín egna kapittul í lógini um megin-, fólka- og skúlabókasøvn við ásetingum um, at landið lat 60 % í studningi

til undirvísingartilfar og -amboð. Stuðulsskipanin til fólkabókasøvn við 60 % í rakstrarstuðli og 50 % í byggistudningi helt fram.

Í 2001 kom løgtingslóg um bókasøvn, sum savnaði lóggávuna á bókasavnsøkinum í eina lóg. Meginbókasøvnini, sum ikki vóru fingin at virka, vórðu strikað úr lógini. Rakstrarstuðulin til fólkabókasøvnini var nú ásettur til í mesta lagi 60 % av góðkendu fíggjarætlanini fyri tað árið.

Í 2004 var aðalorðaskifti á Løgtingi um stuðulsveitingar á mentanarøkinum. Í álitinum varð ásannað, at samsvar ikki er millum játtanir og tørv, og at tað tí var neyðugt antin at játta væl fleiri pengar til endamálini ella at endurskoða lógar- og játtanargrundarlagið. Í álitinum mælti Mentamálaráðið til, at kommunurnar átaka sær størri fíggjarliga ábyrgd av tí mentanartilboði, sum stendur lokalsamfelagnum í boði. Álitið mælti til at endurskoða bókasavnslógina við atliti at ásetingunum um stuðulsgrundarlag og meginbókasøvn.

Bókasavnslógin var dagførd í 2005 við tilmælunum frá álitinum um stuðulsveitingar á mentanarøkinum. Stuðulin til fólkabókasøvn var lækkaður til at vera roknaður í mun til játtaðu upphæddina á løgtingsfíggjarlógini, tó í mesta lagi 40 % av góðkendari fíggjarætlan, og kapittulin um meginbókasøvn varð strikaður.

Í 2007 mælti ein arbeiðsbólkur undir Mentamálaráðnum til at lata kommunurnar bera raksturin av fólkabókasøvnunum.

Í 2013 lótu umboð fyri Landsbókasavnið og Fróðskaparsetur Føroya úr hondum eitt álit um skipan av universitetsbókasavni, og í 2014 varð mælt til samráðingar millum land og kommunur um at býta landið upp í bókasavnsøki við hvør sínum meginbókasavni og at skipa samstarv um talgildar bókasavnstænastur.

Í 2018 varð aftur ein roynd gjørd at koma á mál við dagføringum av bókasavnslógini, serliga til tess at skipa Landsbókasavnið sum universitetsbókasavn. Hóast drúgvu tilgongdina, er eingin broyting gjørd í bókasavnslógini síðan 2005.

### 1.3. Endamálið við uppskotinum

Endamálið við hesum lógaruppskoti er at fáa lógarverkið á bókasavnsøkinum dagført, tí galdandi bókasavnslóg á fleiri økjum ikki er nøktandi. Síðani galdandi bókasavnslóg, løgtingslóg nr. 79 frá 8. mai 2001 um bókasøvn, sum broytt við løgtingslóg nr. 148 frá 20. desember 2005 varð sett í gildi, hevur samfelagið á fleiri økjum verið fyri stórum broytingum.

Internetið og talgildingin hava havt við sær stórar broytingar, ið eisini síggjast aftur á bókasavnsøkinum. Her verður serliga hugsað um atgeingi til føroyskar ljóðbøkur á netinum, men eisini um varðveiting og avhending av talgildum útgávum. Harafturat er stór menning farin fram á útbúgvingarøkinum, ið eigur at síggjast aftur í bókasavnslógini. Víst hevur eisini verið á, at tørvur er á antin at tillaga ella avtaka stuðulsskipanirnar í bókasavnslógini, tí tær tykjast ikki at virka eftir ætlan. Endamálið við uppskotinum er eisini at dagføra skipanirnar við bókasavnsgjaldi og skylduavhending, so at tilskilað verður, at lóggávan eisini fevnir um talgilt tilfar.

Endamálið við lógaruppskotinum er at styrkja bóksavnsøkið, so føroysku fólkabókasøvnini eisini í framtíðini veita fjølbroyttar tænastur í góðari góðsku til allar borgarar í landinum. Skúlabókasøvnini skulu, sbrt. § 23, stk. 2 í løgtingslóg nr. 125 frá 20. juni 1997 um fólkaskúlan, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 52 frá 7. mai 2019, virka sum námsfrøðiligir

tænastudeplar og skúlabókasøvn skulu vera í øllum skúlum, eisini fri̇́skúlum, eftirskúlum og serskúlum. Bókasøvnini á Føroya Fróðskaparsetri og øðrum hægri útbúgvingum skulu veita lesandi, lærarum og granskarum holla universitetsbókasavnstænastu. Landsbókasavnið skal, sum tjóðbókasavn, universitetsbókasavn, vísindabókasavn og høvuðsbókasavn, standa á odda fyri menningini av bókasavnsøkinum í Føroyum.

**1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum**
Við lógaruppskotinum verður staðfest, at øll bókasøvn, ið eru alment fíggjað ella fáa almennan stuðul, mynda bókasavnskervi landsins og taka lut í samstarvinum millum bókasøvn.

Ein nýskipan við lógaruppskotinum er eitt bókasavnsráð, ið skal ráðgeva politisku skipanini í bókasavnsmálum og koma við tilmæli um menning av bókasavnsøkinum.

Ætlanin er at styrkja samstarvið millum fólkabókasøvn, og áseta, at øll fólkabókasøvn skulu hava starvsfólk við hægri bókasavnsfakligari útbúgving. Endamálið er at tryggja, fólkabókasøvnini verða rikin á bókasavnsfakliga haldgóðum grundarlagi og harvið veita fakliga nøktandi tænastur. Lagt verður upp til, at fleiri bókasøvn kunnu samstarva um at seta fólk í starv, ella at eitt fólkabókasavn ger samstarvsavtalu við annað fólkabókasavn, sum hevur starvsfólk við hægri bókasavnsfakligari útbúgving í starvi.

Skúlabókasøvn hava stóran týdning fyri læring og fyri menning av talgildari búgving, og við lógaruppskotinum verður áherðsla løgd á, at allir skúlar skulu hava eitt skúlabókasavn. Eisini frískúlar, eftirskúlar og serskúlar skulu sambært lógaruppskotinum hava skúlabókasøvn.

Við lógaruppskotinum er ætlanin at styrkja og menna universitetsbókasavnið á Fróðskaparsetri Føroya, so tað tryggjar granskarum, undirvísarum, lesandi og øðrum neyðuga atgongd til tilfar og bókasavnstænastur. Ætlanin er, at Landsbókasavnið skal røkja uppgávuna. Í lógaruppskotinum verður tí eisini lagt upp til, at Landsbókasavnið hevur neyðugar førleikar at veita universitetsbókasavnstænastu.

Í lógaruppskotinum er ásett, at partar av høvuðsbókasavnstænastuni, at samskipa keyp av bókum og øðrum tilfari til bókasøvnini, innbinding, skeiðsvirksemi og líknandi, kann verða lagt til eitt av fólkabókasøvnunum at røkja. Tað er landsstýrismaðurin og viðkomandi kommuna, ið gera avtalu um, hvørjir partar av høvuðsbókasavnstænastuni, talan er um.

Tað hevur stóran týdning, at føroyskar ljóðbøkur gerast atkomuligar á netinum, ikki minst fyri tey, ið ikki fáa lisið prentaðan tekst. Við lógaruppskotinum er ætlanin at skipa fyri, at allar tær ljóðbøkur, sum Ljóðbókatænastan á Landsbókasavninum hevur framleitt til fólk, ið ikki kunnu lesa prentaðan tekst, seinastu nógvu árini, verða atkomuligar hjá øllum.

§ 17 í løgtingslóg nr. 30 frá 30. apríl 2015 um upphavsrætt hevur áseting um, at tað til blind, sjónveik, fólk, ið bera talubrek, deyv og til persónar annars, sum vegna brek ikki eru førir fyri at lesa prentaðan tekst, er loyvt at endurgeva og at spjaða eintøk av útgivnum verkum, tá ið hetta er serliga ætlað til nýtslu hjá nevndu persónum. Sambært § 17, stk. 3 í somu lóg er ásett, at ljóðupptøkur av útgivnum bókmentaligum verkum kunnu endurgevast og spjaðast til nýtslu hjá fólki við lesitarni, tá ið hetta ikki verður gjørt við vinningi fyri eyga. Upphavsmaður hevur krav upp á viðurlag.

Ásetingarnar um bókasavnsgjald eru í lógaruppskotinum dagførdar við áseting um bókasavnsgjald til talgilt tilfar á netinum. Eisini verður heimilað landsstýrismanninum at áseta, at bókasavnsgjald, sum er minni enn kr. 500 til hvønn móttakara, ikki verður útgoldið.

Ásetingin um, at eftirlivandi hjúnafelagi hevur rætt til bókasavnsgjald verður við lógaruppskotinum broytt, so at bókasavnsgjaldið framyvir fellur burtur, tá høvundur doyr. Broytingin verður galdandi frá 1. januar 2023, og verður sostatt ikki galdandi fyri teir eftirlivandi hjúnafelagar, ið longu móttaka bókasavnsgjald.

Við hesi broyting er ætlanin at raðfesta bókasavnsgjaldið til virkandi høvundar, og harvið er bókasavnsgjaldið ætlað at stuðla undir útgávu av bókmentum á føroyskum.

Skylduavhendingin er støðið undir tjóðbókaskránni, og við lógaruppskotinum verða ásetingar um talgilt tilfar, tónleik og film nágreinaðar.

Ásetingarnar um vernd av mentanararvi, so sum bøkur, handrit og onnur verk, bæði í almennari og privatari ogn, er óbroytt. Ásetingin skal tryggja, at føroyskur mentanararvur ikki verður fluttur av landinum uttan við loyvi frá landsstýrismanninum.

Við lógaruppskotinum verða stuðulsjáttanirnar til rakstur og íløgur til fólkabókasøvn og undirvísingarambođ til skúlabókasøvn tillagaðar.

Rakstrarstuðulin, sum í galdandi lóggávu verður latin fólkabókasøvnum eftir umsókn, verður í staðin latin til allar kommunur eftir fólkatalinum. Stuðul verður sostatt eisini latin teimum kommunum, sum ikki hava fólkabókasøvn í dag, men sum við lógaruppskotinum skulu veita fólkabókasavnstænastu til borgararnar í kommununi. Hetta kann verða gjørt við at seta á stovn egið fólkabókasavn ella við at gera avtalu við aðra kommunu um at veita fólkabókasavnstænastu. Landsbókasavnið umsitur stuðulin.

Stuðulin til íløgur í bókasavnshøli og stuðulin til undirvísingarambođ til skúlabókasøvn verður tikin av.

Við ásetingum um bókasavnssamstarv og bókasavnsráð veðrur størri dentur lagdur á samstarv og menning á bókasavnsøkinum.

**1.5. Ummæli og ummælisskjal**
Lógaruppskotið hevur verið til ummælis hjá:

- Stjórnarráðunum
- Kommunufelagnum
- Kappingareftirlitinum
- Fróðskaparsetri Føroya
- Vinnuháskúlanum
- Fjølrit
- Felagnum Føroysk Bókaforløg
- Rithøvundafelagnum
- Sjóndeplinum
- Føroya Blindafelag
- Felagnum Lesi- og skriviveik
- Føroya Lærarafelag
- Føroya Pedagogfelag

- Námi
- Undirvísingarstýrinum
- Sjónámi
- Húsarhaldsskúla Føroya
- Føroya Fólkaháskúla
- Rásini
- Ítróttarháskúlanum í Suðuroy
- Mat & Mentanarháskúlanum
- Føroya Eftirskúla
- Brúgvini, eftirskúlinum í Skálavík
- Frískúlanum Kelduni
- Frískúlanum í Havn
- Lítlaskúla
- Skúlanum á Trøðni
- Granskingarráðnum
- Landsbókasavninum
- Tjóðsavninum
- Tjóðskjalasavninum
- Listasavni Føroya
- Havstovuni
- Jarðfeingi
- Umhvørvisstovuni
- LISA
- Bókavarðafelagnum
- Leikarafelag Føroya
- Felagnum Føroysk Myndlistafólk
- Felagnum Føroyskir Yrkisfotografar
- Felagnum Føroysk Miðlafólk

Ummælisskjal (stuttur samandráttur av innkomnu ummælunum saman við viðmerkingum hjá landsstýrismanninum til hesi).

## Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

### 2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Í galdandi lóggávu frá 2005 er ásett, at frá og við fíggjarárinum 2006 skal árliga studningsprosentið roknast í mun til játtaðu upphæddina á løgtingsfíggjarlógini. Studningsprosentið er tó í mesta lagi 40% av góðkendu fíggjarætlanini. Studningsprosentið var áður 60% av góðkendari fíggjarætlan.

Í 2005 var rakstrarjáttanin til fólkabókasøvn 5,174 mió. kr. Í 2006 lækkaði játtanin til fólkabókasøvn til 3,474 mió. kr. og í 2013 lækkaði játtanin til fólkabókasøvn til 2,844 mió. kr. Hetta komst av, at umsitingargjøld, ið Landsbókasavnið álegði fólkabókasøvnunum, vórðu flutt av játtanini til stuðul, og í staðin løgd afturat rakstrarjáttanini hjá Landsbókasavninum. Játtanin frá landinum til rakstur av fólkabókasøvnum er í 2022 framvegis 2,844 mió. kr.

Hildið verður, at stuðulsskipanirnar í galdandi lóggávu ikki í nóg stóran mun virka eftir ætlan. Í 2022 høvdu fólkabókasøvnini eina samlaða fíggjarætlan upp á 18,308 mió. kr., harav 16,650 mió. kr. vórðu góðkendar sum grundarlag fyri at fáa rakstrarstuðul frá landinum.

### Talva 1. Góðkendur og fráboðaður stuðul 2021 og stuðulsprosent

| Navn | Fíggjarætlan 2022 | Góðkend fíggjarætlan í alt | Fráboðaður max. stuðul 2021 | Stuðulspct |
|---|---|---|---|---|
| Bókasavnið við Løkin | 1.178.000 kr. | 750.000 kr. | 178.918 kr. | 24 |
| Býarbókasavnið | 10.196.000 kr. | 9.780.000 kr. | 1.284.352 kr. | 13 |
| Fuglafjarðar bókasavn | 1.133.500 kr. | 972.000 kr. | 170.022 kr. | 17 |
| Bókasavnið í Eysturkommunu | 454.000 kr. | 386.000 kr. | 93.376 kr. | 24 |
| Hvalbiar skúlabókasavn | 50.000 kr. | 31.642 kr. | 9.937 kr. | 31 |
| Hvalvíkar bókasavn | 298.725 kr. | 247.800 kr. | 43.946 kr. | 18 |
| Klaksvíkar bókasavn | 2.130.000 kr. | 1.997.000 kr. | 491.217 kr. | 25 |
| Kvívíkar skúlabókasavn | 175.500 kr. | 157.000 kr. | 58.059 kr. | 37 |
| Nes bókasavn | 264.000 kr. | 202.000 kr. | 46.321 kr. | 23 |
| Sandoyar meginskúli | 99.500 kr. | 87.000 kr. | 25.339 kr. | 29 |
| Sands bókasavn | 275.000 kr. | 255.000 kr. | 58.490 kr. | 23 |
| Stranda bókasavn | 200.000 kr. | 164.000 kr. | 36.839 kr. | 22 |
| Sunda bókasavn, Oyrabakki | 258.000 kr. | 236.000 kr. | 74.435 kr. | 32 |
| Sørvágs bókasavn | 220.500 kr. | 152.000 kr. | 35.234 kr. | 23 |
| Tvøroyrar bókasavn | 159.000 kr. | 128.000 kr. | 41.678 kr. | 33 |
| Vága bókasavn | 191.500 kr. | 161.000 kr. | 47.269 kr. | 29 |
| Vágs bókasavn | 742.800 kr. | 722.800 kr. | 100.684 kr. | 14 |
| Vestmanna bókasavn | 281.825 kr. | 221.000 kr. | 47.885 kr. | 22 |
| | 18.307.850 kr. | 16.650.242 kr. | 2.844.001 kr. | |

Í talvu 1 omanfyri sæst, at einki av fólkabókasøvnunum eftir galdandi skipan fær meir enn 37 % í stuðli til rakstur, meðan tey allarflestu fáa nógv minni, heilt niður í 13 % av góðkendari fíggjarætlan.

Orsøkin, til at stuðulsprosentið er so ymiskt, er, at stuðulin í stóran mun er tillutaður eftir, hvat fólkabókasøvnini hava fingið í sín part árið fyri. Hetta fyri at hava ein ávísan stabilitet á fólkabókasøvnunum, tí játtanin til endamálið hevur seinastu árini verið tann sama. Hetta hevur tó havt við sær, at tær kommunur, ið menna teirra bókasavnstænastur, ikki hava fingið tilsvarandi stuðul frá landinum, og at tær hava fíggjað menningina sjálvar. Hetta sæst serliga aftur í rakstrarstuðlinum til Býarbókasavnið í Havn, í Vági, í Fuglafirði og í Hvalvík. Klaksvíkar Bókasavn og Bókasavnið við Løkin fáa ávikavist 25 % og 24 % í rakstrarstuðli av góðkendari fíggjarætlan. Skuldi stuðulin til fólkabókasøvnini verið 40 % av góðkendari

fíggjarætlan, hevði verið neyðugt við ein játtan til fólkabókasøvnini upp á 6,660 mió. kr. í 2022, sum er meir enn tvífalt ta játtan, sum er sett av til endamálið á løgtingsfíggjarlógini.

Fyri kommunurnar eru fíggjarligu avleiðingarnar av lógaruppskotinum, at stuðulsskipanirnar í galdandi lóggávu verða tillagaðar soleiðis, at játtanin verður býtt eftir fólkatalinum í kommununum.

Ætlanin er, at stuðulsjáttanin verður tillagað sambært talvu 2 niðanfyri soleiðis at allar kommunur fáa lut í stuðlinum til fólkabókasøvn. Í talvuni sæst, at verður stuðulin býttur til kommunurnar eftir tali av borgarum í kommununi, so verður býtið av stuðlinum nakað øðrvísi, enn hann er í dag. Við broytingini verður lagt upp til, at tær kommunur, sum í dag ikki hava egið fólkabókasavn, antin seta á stovn egið fólkabókasavn ella gera avtalu við aðra kommunu um at veitafólkabókasavnstænastu, og rinda fyri hana, partvís við stuðli frá landinum.

**Talva 2. Fráboðaður stuðul 2021 og dømi um stuðul býttur eftir fólkatali**

| kommunur | bókasøvn | fólkatal aug 2022 | fráboðaður stuðul 2021 | stuðul pr. borgara | Stuðul pr. kommunu | stuðul pr. borgara |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Nes kommuna | Nes bókasavn | 1.482 | 46.321 | 31 | 77.764 | 52,5 |
| Runavíkar kommuna | Bókasavnið við Løkin | 4.326 | 178.918 | 41 | 226.995 | 52,5 |
| Eystur kommuna | Gøtu bókasavn | 2.300 | 93.376 | 41 | 120.686 | 52,5 |
| Tórshavnar kommuna | Býarbókasavnið | 23.071 | 1.284.352 | 56 | 1.210.589 | 52,5 |
| Fuglafjarðar kommuna | Fuglafjarðar bókasavn | 1.630 | 170.022 | 104 | 85.530 | 52,5 |
| Hvalbiar kommuna | Hvalbiar skúlabókasavn | 668 | 9.937 | 15 | 35.052 | 52,5 |
| Sunda kommuna | Hvalvíkar bókasavn | | 43.946 | | | 52,5 |
| Sunda kommuna | Sunda bókasavn | 1.842 | 74.434 | 40 | 96.654 | 52,5 |
| Klaksvíkar kommuna | Klaksvíkar bókasavn | 5.405 | 491.217 | 91 | 283.613 | 52,5 |
| Kvívíkar kommuna | Kvívíkar skúlabókasavn | 608 | 58.059 | 95 | 31.903 | 52,5 |
| Sands kommuna | Meginskúlin á Sandi | | 25.339 | | | 52,5 |
| Sands kommuna | Sands bókasavn | 522 | 58.490 | 112 | 27.391 | 52,5 |
| Sjóvar kommuna | Stranda bókasavn | 1.158 | 36.839 | 32 | 60.763 | 52,5 |
| Sørvágs kommuna | Sørvágs bókasavn | 1.249 | 35.234 | 28 | 65.538 | 52,5 |
| Tvøroyrar kommuna | Tvøroyrar bókasavn | 1.778 | 41.678 | 23 | 93.296 | 52,5 |
| Vága kommuna | Vága bókasavn | 2.171 | 47.269 | 22 | 113.917 | 52,5 |
| Vágs kommuna | Vágs bókasavn | 1.363 | 100.684 | 74 | 71.520 | 52,5 |
| Vestmanna kommuna | Vestmanna bókasavn | 1.268 | 47.885 | 38 | 66.535 | 52,5 |
| Fuglaoyar kommuna | | 38 | | 0 | 1.994 | 52,5 |
| Viðareiðis kommuna | | 347 | | 0 | 18.208 | 52,5 |
| Hvannasunds kommuna | | 419 | | 0 | 21.986 | 52,5 |
| Kunoyar kommuna | | 146 | | 0 | 7.661 | 52,5 |
| Eiðis kommuna | | 796 | | 0 | 41.768 | 52,5 |
| Skopunar kommuna | | 465 | | 0 | 24.400 | 52,5 |
| Skálavíkar kommuna | | 137 | | 0 | 7.189 | 52,5 |
| Húsavíkar kommuna | | 107 | | 0 | 5.615 | 52,5 |
| Skúgvoyar kommuna | | 40 | | 0 | 2.099 | 52,5 |
| Fámjins | | 82 | | 0 | 4.303 | 52,5 |
| Hovs kommuna | | 104 | | 0 | 5.457 | 52,5 |
| Porkeris kommuna | | 329 | | 0 | 17.263 | 52,5 |
| Sumbiar kommuna | | 349 | | 0 | 18.313 | 52,5 |
| Íalt | | 54.200 | 2.844.000 | | 2.844.000 | |

Ásetingin í galdandi lóggávu um stuðul til íløgur í bókasavnshøli, hevur bert verið brúkt í tveimum førum. Í 2004 fekk Gøtu bókasavn 363.823 kr. í stuðli og Sands bókasavn fekk í árunum 2006-2009 2.500.000 kr. í stuðli.

Søkt hevur verið um stuðul til aðrar útbyggingar, men játtan hevur ikki verið tøk til endamálið á løgtingsfíggjarlógini. Við lógaruppskotinum verður stuðulin til íløgur í bókasavnshøli tikin av.

Stuðulin til undirvísingartilfar og undirvísingartilboð til skúlabókasøvn, sum í galdandi lóggávu er 60% av góðkendari fíggjarætlan, verður við lógaruppskotinum tikin av. Játtanin til endamálið er partur av játtanin til fólkabókasøvn. Ein stórur partur av skúlabókasøvnunum hava ikki fingið stuðul eftir hesi skipan.

Talgildu tænasturnar eru í stórum vøkstri. Tað er tó torført neyvt at áseta, hvussu stórari játtan tørvur er á til endamálið í 2023.

Býarbókasavnið í Havn hevur seinastu árini bjóðað út lán av e-bókum, talgildum ljóðbókum, podkasti og filmum. Talan er um samstarv við Det Digitale Folkebibliotek, og bøkurnar eru tøkar á eReolen gjøgnum bókasavnskipanina Cicero, ið Býarbókasavnið brúkar. Tað er sama tænasta, ið eftir ætlan verður tøk hjá hinum fólkabókasøvnunum gjøgnum bókasavnsskipanina Reindex hjá Landsbókasavninum í 2023.

Fyri at fáa eina ábending um kostnaðin á talgildu tænastunum fyri alt landið, eru útreiðslurnar, ið Býarbókasavnið hevur, brúktar sum grundarlag fyri kostnaðin, ið aðrar kommunur koma at rinda fyri talgildu tænasturnar. Vart verður tó gjørt við, at føroyskar ljóðbøkur ikki eru til láns enn. Í summum førum eru tað borgarar úr øðrum kommunum, ið lána talgildar ljóðbøkur á Býarbókasavninum í Havn.

Býarbókasavnið rindaði í 2021 eitt fast ársgjald upp á 13.448 kr. til Det Digitale Folkebibliotek. Nýtslugjaldið fyri 6.743 lán av ljóðbókum kostaði 61.997 kr., sum er 9,19 kr. fyri hvørt lánið. Nýtslugjaldið fyri 3.280 e-bøkur var 28.473 kr., sum er 8,68 kr. fyri hvørt lánið. Tølini eru roknað út frá 20.000 borgarum, og gjaldið var í 2021 103.918 kr. tilsamans. Harafturat rindaði Býarbókasavnið í 2021 fyri útlán av filmi gjøgnum Filmstriben 25.900 kr.

Tá skipanin við Det Digitale Folkebibliotk verður tøk kring alt landið, verða tað kommunurnar sjálvar, ið mugu semjast um, hvussu nógv teirra fólkabókasøvn skulu brúka upp á talgildar tænastur. Tað vil siga, hvussu nógv lán ella klipp teirra borgarar fáa atgongd til um mánaðin.

Kostnaðurin er lagaður eftir, hvussu nógv klipp, ið einstaki brúkarin fær at ráða yvir, og hvussu nógv lán verða framd. Kostnaðurin á einstøku bókini er eisini lagaður eftir, um talan er um eina nýggja ella eldri bókaútgávu, eina barnabók ella annað tilfar.

Tað er ringt at siga, hvussu nógv brúkið av eReolen fer at vaksa, tá føroyskar e-bøkur og ljóðbøkur verða til láns á heimasíðunum hjá fólkabókasøvnunum.

Tað er eisini ringt at meta um játtanartørvin til talgildar tænastur hjá Ljóðbókatænastuni á Landsbókasavninum, tí vit kenna ikki nýtsluna av føroyskum ljóðbókum, og vit vita heldur ikki, hvussu nógvir brúkarar verða fevndir av serligu skipanini til blind, sjónveik og tey, ið hava lesitrupulleikar.

Sambært Sjóndeplinum eru tað umleið 40 blindir brúkarar í teirra skipan, men Ljóðbókatænastan veitir eisini ljóðbókatænastu til fólk, ið eru sjónveik, og sum hava lesitrupulleikar. Í Danmark hava blind og sjónveik atgongd til 40 lán um mánaðin gjøgnum blindabókasavnið Nota.

Tað er ringt at meta um nýtsluna av føroyskum ljóðbókum fyrr enn skipanin er royndarkoyrd. Kostnaðurin fyri hvørt klippið er tó á leið tann sami sum hjá Býarbókasavninum, tað vil siga 9,19 kr. fyri hvørt lánið.

Játtanartørvurin til bókasavnsgjald til rithøvundar fyri atgongd til talgildar ljóðbøkur gjøgnum eReolen er ikki beinleiðis tengdur at lógaruppskotinum. Talan er gjald til rættindahavarar fyri tilfar, ið áður ikki hevur verið talt við í uppgerðina fyri bókasavnsgjaldið. Fyrsta árið, ið skipanin við talgildum lánum av ljóðbókum og e-bókum virkaði í Danmark, vórðu 3% av bókasavnsgjaldinum til rithøvundar sett av til talgild lán. Posentparturin er síðani hækkaður, fyrst til 6%, og síðan hevur ætlanin verið, at lutfallið millum lán av prentaðum bókum og talgildum bókum skal síggjast aftur í bókasavnsgjaldinum. Í Danmark var játtanin til bókasavnsgjald í 2022 185,5 mió. kr. Harav vóru 166 mió. kr rindaðar fyri fysiskar bøkur, svarandi til 89,5% og 19,5 mió. kr. vórðu rindaðar fyri talgilt tilfar, svarandi til 10,5% av játtanini.

Ætlanin er, at játtan eisini skal setast av til útlán av føroyskum filmi og føroyskari list. Skipanir við útláni av list eru royndar eitt nú í Danmark og Íslandi.

Arbeiðið við tjóðbókaskránni er vaksandi, og skrásetingin av filmi og tónleiki er arbeiðskrevjandi. Tørvur er á, at Landsbókasavnið fær játtan til endamálið.

Stórur tørvur er á at menna universitetsbókasavnstænastuna á Landsbókasavninum. Avtala varð gjørd millum Fróðskaparsetur Føroya og Landsbókasavnið í 1994 um at ein bókavørður á Landsbókasavninum skuldi røkja bókasavnsuppgávur á Fróðskaparsetrinum. Síðan 1994 er Fróðskaparsetrið ment í stóran mun, men tað hevur ikki sæst aftur í raðfestingini til bókasavnstænastur. Tørvur er á játtan til Landsbókasavnið til at menna universitetsbókasavnstænasturnar. Harafturat skal ein nýggj avtala gerast millum Fróðskaparsetur Føroya og Landsbókasavnið um at Landsbókasavnið røkir universitetsbóksavnið á Fróðskaparsetrinum.

Skotið verður upp, at 2023 verður eitt slag av royndarári, har mett verður um játtanartørvin fyri komandi árini.

### 2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Tillagingin av rakstrarstuðlinum og avtøkan av íløgustuðli til høli til fólkabókasøvn og stuðli til undirvísingartilfar og undirvísingaramboð til skúlabókasøvnini hevur væntandi við sær minni umsiting hjá landi og kommunum.

Tá avtalur skulu gerast millum kommunur um veitan av fólkabókasavnstænanastu ella kommunur keypa fólkabókasavnstænastu frá einum fólkabókasavni í aðrari kommunu, fer tað at hava nakað av umsiting við sær. Hildið verður tó, at talan er um uppgávur, ið líkjast øðrum uppgávum, ið kommunurnar longu umsita.
Bókasavnssamstarv og bókasavnsráð fara at hava nakað av umsiting við sær fyri Landsbókasavnið.

**2.3. Avleiðingar fyri vinnuna**
Lógaruppskotið hevur ongar fíggjarligar ella umsitingarligar avleiðingar fyri vinnuna.

**2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið**
Lógaruppskotið hevur ongar avleiðingar fyri umhvørvið.

**2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum**
Lógaruppskotið hevur ongar beinleiðis avleiðingar fyri serstøk øki í landinum, men við lógaruppskotinum verður áherðsla løgd á, at bókasavnstænastur skulu vera atkomuligar hjá øllum borgarum í landinum.

**2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir**
Lógaruppskotið hevur við sær, at álagt verður øllum skúlum at hava skúlabókasøvn. Álagt verður harvið frískúlum, eftirskúlum og øðrum skúlum at veita bókasavnstænastur, eins og álagt er fólkaskúlum í fólkaskúlalógini.

Við lógaruppskotinum verða viðurskiftini á ljóðbókaøkinum skipað, so at atgeingi til ljóðbøkur til tey, ið ikki fáa lisið prentaðan tekst, verður lættari, við tað at atgongd fæst til føroyskar ljóðbøkur á netinum.

Lógaruppskotið hevur við sær, at eftirlivandi hjúnarfelagar ikki longur varðveita rættin til bókasavnsgjald. Tó varðveita eftirlivandi hjúnarfelagar, ið longu fáa bókasavnsgjald útgoldið, rættin til bókasavnsgjald.

**2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum**
Eingir millumtjóða sáttmálar eru á bókasavnsøkinum. Tó eru yvirlýsingarnar hjá IFLA og UNESCO á bókasavnskøkinum, eitt nú yvirlýsingin um fólkabókasøvn og yvirlýsingin um skúlabókasøvn grundarlag undir lógaruppskotinum. Barnarættindasáttmálin hjá ST er eisini viðkomandi.

Føroyar hava tikið undir við UNESCO sáttmálanum um verju av siðaarvi. Sáttmálin áleggur londunum at tryggja siðaarv, so sum siðvenjur, ímyndir, framburðir, vitan, dugnaskap, eins og tól, lutir, gripir og mentanarlig rúm, ið havi tilknýti til henda siðaarv, og sum samfeløg, bólkar og í einstøkum førum einstaklingar viðurkenna sum part av mentanararvi teirra. Málsligur framburður, eitt nú skaldskapur av mannamunni, kvæðamentan og sangur eins og lutir og rúm, ið eru knýtt at framburðinum, eru týðandi partar av siðaarvinum og harvið fyri virksemið á bókasøvnum.

**2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar**
Hoyvíkssáttmálin er ikki viðkomandi fyri bókasavnsøkið.

Lógaruppskotið hevur ásetingar um, at øll hava rætt til bókasavnstænastur og lógaruppskotið samsvarar tí við Evoropeiska mannarættindasáttmálan, EMRS, grein 10 (1), ið verjir frælsið at leita sær vitan og kunning (informatiónsfrælsi).

Í mun til fólk, ið bera brek, er lógaruppskotið við til at verja móti mismuni í mun til rættin at leita sær vitan og kunning. Lógaruppskotið kann tí eisini sigast at samsvara væl við forboðið móti mismuni sambært EMRS grein 10 (1) hildið saman við EMRS grein 14, ið verjir móti mismuni, tá ið tað kemur til vard rættindi og frælsi sambært EMRS, sbr. grein 1.

Lógaruppskotið hevur ásetingar um, at bókasøvn skulu vera atkomulig hjá øllum, eisini teimum, ið bera brek. Lógaruppskotið hevur harafturat ásetingar um, at tey, ið ikki fáa lisið prentaðan tekst, skulu hava atgongd til ljóðbøkur. Lógaruppskotið er tí í samsvari við ST sáttmálan um rættindi hjá einstakligum, ið bera brek.

**2.9. Markaforðingar**
Lógaruppskotið elvir ikki til marknaforðingar.

Lógaruppskotið hevur hinvegin ásetingar um lánisamstarv, eisini tvørtur um landamørk. Viðvíkjandi útláni av ljóðbókum til tey, ið ikki fáa lisið prentaðan tekst, kann Marrakesch direktivið, sum snýr seg um rættin til at geva út verk til teirra, ið hava serligan tørv, verða viðkomandi, men Føroyar hava ikki enn innlimað direktivið í sína lóggávu.

**2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv**
Lógaruppskotið hevur somu ásetingar um revsing sum í galdandi lóggávu. Lógaruppskotið áleggur likamligum og løgfrøðiligum persónum skyldu at avhenda verk, ið eru útgivin í Føroyum ella við føroyska marknaðinum fyri eyga, sbr. § 27, § 29, §§ 33-34, §§ 36-37 og § 40, sum hevur forboð móti at útflyta mentanargripir, so sum bøkur, handrit eldri enn 100 ár, uttan við loyvi frá landsstýrismanninum. Brot á ásetingarnar verður sbrt. § 42 revsað við sekt.

**2.11. Skattir og avgjøld**
Lógaruppskotið hevur ongar ásetingar um skattir og avgjøld.

**2.12. Gjøld**
Lógaruppskotið ásetur, at bókasavnstænastur eru ókeypis. Tó kunnu bókasøvn taka gjald fyri aðrar tænastur, so sum ljóstøk og postgjald. Eisini kann Landsbókasavnið taka gjald fyri veiting av høvuðsbókasavnstænastum til fólkabókasøvn og skúlabókasøvn. Talan er um klárgering av bókasavnstilfari, skeiðstænastur og aðrar líknandi tænastur. Eisini kann talan vera um, at Landsbókasavnið veitir bókasavnstænastur til granskingarstovnar og onnur. Landsbókasavnið kann eisini taka gjald fyri at framleiða ljóðbøkur.

Bókasøvn kunnu eisini áseta gjøld fyri tilfar, ið verður latið ov seint inn aftur ella tilfar, ið verður skalað.

**2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?**
Lógaruppskotið áleggur stovnum og kommunum skyldur sambært ásetingunum um rakstur av fólkabókasøvnum, skúlabókasøvn og bóksøvnum á hægri útbúgvingarstovnum.

Lógaruppskotið áleggur einstaklingum og feløgum skyldur i sambandi við skylduavhending av tilfari til tjóðbókaskránna og skyldubókasavn.

**2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?**
Lógaruppskotið heimilar landsstýrismanninum at áseta reglur viðvíkjandi útgjaldi av bókasavnsgjaldi til høvundar og heimilar, at bókasavnsgjald, sum er minni enn kr. 500, ikki verður útgoldið.

Lógaruppskotið heimilar Landsbókasavninum at hava inntøkufíggjað virksemi, so sum at taka gjald fyri tænastur, ið Landsbókasavnið veitir almennum stovnum, privatum stovnum,

granskarum og øðrum, og sum liggja uttan fyri tær vanligu tænasturnar, ið Landsbókasavnið er álagt at veita.

Lógaruppskotið heimilar landsstýrismanninum at útveita partar av høvuðsbókasavnstænastuni.

Lógaruppskotið heimilar bókasøvnum at áseta skilhaldsreglur.

**2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?**
Lógaruppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn.

**2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?**
Lógaruppskotið stuðlar á fleiri økjum undir *tey 17 Heimsmálini hjá ST* fyri burðardyggari menning.

Lógaruppskotið leggur dent á uppgávuna hjá bókasøvnunum at veita fría atgongd til upplýsing, lærdóm og mentan, umframt leiklutin hjá bókasøvnunum at stimbra fólkaræðisliga rættin at taka lut í samfelagnum. Harvið er lógaruppskotið í samsvari við heimsmál 16.10 um at tryggja almenna atgongd til upplýsing.

Í lógaruppskotinum verður ásett, at skúlabókasøvn skulu vera í øllum skúlum. Eisini eru ásetingar um bókasøvn á hægri úbúgvingarstovnum, ið eru ætlað at tryggja og menna bókasavnstænasturnar á Fróðskaparsetri Føroya og øðrum útbúgvingum. Ásetingarnar eru í samsvari við heimsmál 4 um góðsku í útbúgving og um menning av lesiførleikum.

Við lógaruppskotinum verður dentur lagdur á samstarv millum bókasøvn og á leiklutin hjá Landsbókasavninum at menna bókasavnsøkið. Í 2021 fekk Landsbókasavnið limaskap í IFLA, (Internatinal Federation of Library Associations and Institutions), sum hevur sett heimsmálini á skrá við skráseting, menning og samskipan av verkætlanum um heimsmálini á bókasøvnum kring allan heim. Ásetingarnar stuðla undir heimsmál 17 um samstørv um heimsmálini.

**2.17. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum**

| | Fyri landið ella landsmyndug-leikar | Fyri kommunalar myndugleikar | Fyri pláss ella øki í landinum | Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar | ja | ja | ja | ja | nei |
| Umsitingarligar avleiðingar | ja | ja | nei | Ja | nei |
| Umhvørvisligar avleiðingar | nei | nei | nei | nei | nei |
| Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur | ja | nei | nei | Ja | nei |
| Sosialar avleiðingar | | | nei | Ja | |

## Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

### 3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

**Til § 1**
Ásetingin lýsir yvirskipaða endamálið við bókasøvnum. Greinin tekur støði í yvirlýsingum hjá IFLA (International Federation of Library Associations and Institutions) um bókasøvn, serliga yvirlýsing um fólkabókasøvn, sum UNESCO (United Nations Educational Scientific and Cultural Organisation) í samstarvi við IFLA, við støði í grein 19 í mannarættindasáttmálanum, samtykti í 1949, og sum seinast varð dagførd í 1994. Við yvirlýsingini fingu heimsins lond í uppgávu at veita borgarunum fría atgongd til vitan og upplýsing við at seta á stovn almenn bókasøvn. Umframt yvirlýsing um fólkabókasøvn eru yvirlýsingarnar um bókasavnstænastur til fólk við niðursettum lesiførleika, yvirlýsing um fjølmentanarlig bókasøvn, yvirlýsing um skúlabókasøvn, yvirlýsing um talgild bókasøvn og yvirlýsing um hagtøl á bókasavnsøkinum grundarlag undir lógaruppskotinum. Tað er grundleggjandi, at tilfar á bókasøvnum er ókeypis at lána.

Nýtt í mun til galdandi lóggávu er, at greinin eisini vísir á leiklutin hjá bókasøvnum, tá tað kemur til at tryggja mentanararvin, ið bókasøvnini varða av. Talan er um innihaldið í samlingunum á bókasøvnunum, harundir eisini serliga virðismiklar útgávur.

Stk. 2 er ein dagføring av § 2 í galdandi lóggávu, ið ásetur, at tilfar á bókasøvnum skal vera dygdargott og óheft av hugsjónarligum, politiskum og átrúnaðarligum áhugamálum. Við ásetingini verður staðfest, at bókasøvnini skulu hava til taks bøkur og annað tilfar. Annað tilfar kann til dømis vera greinar, filmur, tónleikur og list.

**Til § 2**
Ásetingin er nýggj í mun til galdandi lóggávu. Ásetingin er gjørd fyri at tilskila, hvørji bókasøvn eru fevnd av lógini. Talan er um 1) fólkabókasøvn, 2) skúlabókasøvn, 3) bókasøvn á hægri útbúgvingarstovnum, 4) Landsbókasavnið og 5) onnur heilt ella lutvíst alment fíggjað bókasøvn.

Fólkabókasøvn eru bókasøvn, sum kommunurnar eiga og reka, og har almenningurin hevur atgongd. Skúlabókasøvn eru bókasøvn í fólkaskúlum, frískúlum, eftirskúlum, serskúlum og miðnámsskúlum, og verða fíggjað av rakstrinum hjá viðkomandi skúla. Bókasøvn á hægri útbúgvingarstovnum fevna um bókasøvn á Fróðskaparsetri Føroya og Vinnuháskúlanum og á øðrum hægri útbúgvingarstovnum, ið verða alment fíggjaðir.

Landsbókasavnið er tjóðbókasavn, universitetsbókasavn og ljóðbókasavn og veitir høvuðsbókasavnstænastu, umsitur bóksavnsgjaldið og tekur ímóti tilfari, ið verður skylduavhent.

Lóggávan fevnir eisini um onnur alment fíggjað bókasøvn í almennu fyrisitingini og á mentanar- og granskingarstovnum, eitt nú á Námi, Løgmansskrivstovuni, Listasavni Føroya og Jarðfeingi.

“Alment bókasavnsvirksemi” sambært hesi løgtingslóg er bæði virksemi, ið landið fíggjarog virksemi, ið kommunurnar fíggja.

**Til § 3**
Ásetingin er nýggj. Felags bókasavnskervið, sum Landsbókasavnið skipar, skal tryggja samstarv og vitanardeiling á øllum teimum bókasøvnum, ið eru fevnd av lógaruppskotinum. Bókasavnskervið tryggjar, at øll bókasøvn eru partur av skipan, har ið bókasøvn kunnu lána bøkur frá hvørjum øðrum, og harvið veita sínum brúkarum eina betri og fjølbroyttari tænastu.

Greinin ásetur somuleiðis, at bókasøvnini skulu verða partur av bókasavnsskipan, ið Landsbókasavnið hevur góðkent. Flestu bókasøvnini kring landið eru partur av bókasavnsskipanini, ið Landsbókasavnið rekur. Býarbókasavnið í Havn hevur tó sína egnu bókasavnsskipan, ið skúlabókasøvnini í Tórshavnar kommunu eisini eru partur av. Harafturat hevur Nám sína egnu bókasavnsskipan. Orsøkin til, at Landsbókasavnið skal góðkenna bókasavnsskipanir, er, at Landsbókasavnið brúkar skrásetingarnar yvir tilfar og útlán í bókasavnsskipanunum til at gera útrokningarnar, ið verða brúkar til at rinda bókasavnsgjaldið eftir. Eisini skal tað verða møguligt at leita í øllum bókasavnsskipanunum, hetta fyri at tryggja felags lánisamstarvið millum bókasøvn.

Felags lánisamstarvið er ein altjóða skipan, Interlibrary Loaning, ið skipar útlán millum bókasøvn kring allan heim. Lánisamstarvið virkar bæði innanlands og uttanlands og millum ymisk sløg av bókasøvnum og hevur við sær, at bókasøvn kunnu lána bøkur og tilfar frá hvørjum øðrum. Greinin ásetur, at bókasøvn skulu innganga í felags lánisamstarv millum bókasøvn. Greinin heimilar landsstýrismanninum at geva kommunum og stovnum boð um skyldurnar í stk. 1-3.

**Til § 4**
Greinin hevur áseting um eitt nýtt bókasavnsráð. Endamálið við bókasavnsráðnum er at veita politisku skipanini ráðgeving og á tann hátt at tryggja dygd og menning á bókasavnsøkinum. Landsstýrismaðurin setur bókasavnsráðið við breiðari umboðan frá landi, kommunum, stovnum og fakfólkum á bókasavnsøkinum.

Ætlanin er, at Bókasavnsráðið skal viðgera og kunna um bókasavnspolitik og bókasavnsfaklig rák og gera tilmæli um menning av føroysku bókasøvnunum. Ætlanin er, at Landsbókasavnið virkar sum skrivstova fyri bókasavnsráðið, og at stjórin á Landsbókasavninum er skrivari í ráðnum.

**Til § 5**
Greinin er ein dagføring av ásetingunum um fólkabókasøvn í galdandi lóggávu. Ásetingin er gjørd við støði í yvirlýsing um fólkabókasøvn hjá IFLA/UNESCO frá 1994. Upplýsing, lærdómur og luttøka í mentanarlívinum eru grundleggjandi uppgávur hjá fólkabókasøvnum, og hesar uppgávur eru eisini orðaðar í galdandi lóggávu. Í ásetingini í stk. 1 er hugtakið talgild búgving komið afturat. Talgild búgving er føroyska heitið á “digital literacy”, sum umframt talgilda búgving fevnir um miðlabúgving (media literacy), talgildar førleikar (digital capability) og upplýsingarbúgving (information literacy). Hetta eru øll týðandi hugtøk, tá tað kemur til upplýsing og læring á talgildum miðlum og harvið luttøku í samfelagnum. Bókasøvnini eru týðandi stovnar, tá tað kemur til at fremja talgilda búgving.

Umframt at vera stovnar fyri vitan og upplýsing, hava bókasøvnini stóran týdning fyri trivnaðin hjá borgarum og integratión av tilflytarum. Leikluturin hjá bókasøvnunum at fremja lesihugin, at miðla kunnleikan til og skapa áhuga fyri máli og bókmentum er alsamt vorðin meiri virkin. Menningin á bókasavnsøkinum er stór, ikki minst á talgilda økinum.

Stk. 1 tilskilar, hvørjar tænastur, ið fólkabókasøvnini skulu veita, og hvat fyri tilfar, ið eigur at vera tøkt á fólkabókasøvnunum.

Stk. 2 tilskilar, at øll skulu hava atgongd til fólkabókasøvn, tað vil siga, at fólkabókasøvn skulu vera opin fyri øllum, bæði borgarum í viðkomandi kommunu og aðrastaðni frá. Fólkabókasøvn skulu eisini vera atkomulig hjá fólki, ið eru illa gongd ella sita í koyristóli og fólkabókasøvnini skulu annars fylgja ásetingunum í ST-sáttmálanum um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek.

Í stk. 3 verður víst á, at fólkabókasavnið skal leggja seg eftir at fremja lesing og áhuga fyri bókmentum. Tað merkir, at fólkabókasøvnini skulu vera opin og trygg almenn rúm við viðkomandi fakfólki, ið kunnu vegleiða og hava ein aktivan leiklut í menningini av bókasanvstænastum.

Í stk. 4 er ásett, at bókasøvn skulu raðfesta tilfar, ið fremur málmenning og stimbrar lesihugin hjá børnum og ungum. Fólkabókasøvn eiga at hava tilboð til børn, ung og familjur teirra, ið eru viðkomandi og eggja til, at bókasavnið verður brúkt frá barnsbeini av. Í mun til uppgávuna hjá skúlaverkinum, so er fólkabókasavnið eitt opið og frítt rúm, ið kann verða við til at fremja lesing og áhuga fyri bókmentum á aðrar hættir enn skúlaverkið kann.

Stk. 5 ásetur, at fólkabókasøvnini skulu veita bókasavnstænastur til fólk við serligum tørvi. Tað kann vera tilfar til blind og sjónveik, til fólk við avmarkaðum lesiførleikum, eitt nú ljóðbøkur og annað tilfar, ið er egnað til ymsar málbólkar.

Ásetingin í stk. 6 um at fólkabókasøvn skulu hava til taks bókmentir á fleiri málum, leggur dent á inklusión á fólkabókasøvnunum. Fólkabókasøvnini skulu vera atkomulig hjá tilflytarum við at hava til taks bókmentir á fleiri málum, til dømis á teimum málum, ið er móðurmál hjá borgarum í kommununi.

**Til § 6**
Eins og í galdandi lóggávu verður ásett í stk. 1, at fólkabókasøvn eru kommunalir stovnar. Við lógaruppskotinum verður dentur lagdur á at tryggja fakliga støðið á fólkabókasøvnunum, so at tey verða før fyri at veita øllum borgarum í landinum eina nøktandi bókasavnstænastu.

Ásett verður í stk. 1, at allar kommunur skulu veita fólkabókasavnstænastu.

Í galdandi lóggávu er ásett, at leiðarin á einum fólkabókasavni skal vera bókavørður. Í lógaruppskotinum er ásetingin broytt, so at tað nú í § 6, stk. 2 er sett sum treyt, at fólkabókasøvn skulu hava starvsfólk við hægri bókasavnsfakligari útbúgving í starvi.

Starvsfólk við hægri bókasavnsfakligari útbúgving hava serfrøðingavitan um bókasavnsrakstur, harundir um bókasavnsskipanir, skráseting, innkeyp, kassatión, klassifikatión, leiting, vegleiðing, meting av tilfar og keldum og miðlan av bókmentanarligum tilfari. Starvsfólk við bókasavnsfakligari útbúgving hava høvuðsleiklutin í at tryggja, at fólkabókasøvnini fremja upplýsing, lærdóm, talgilda búgving og luttøku í mentanarlívinum og samfelagnum sum heild, so sum ásett er í § 5.

Orsøkin til broytingina er partvís, at útbúgvingin til bókavørð er broytt og partvís, at fleiri av bókasøvnunum kring landið eru smá bókasøvn, ið hava avmarkaða upplatingartíð ella eru skipað sum partur av øðrum virksemi, eitt nú kunningarstovum.

Í dag er vanligt, at tey lesandi taka eina kandidatútbúgving sum cand.scient.bibl. ella aðra líknandi hægri bókasavnsfakliga kandidatútbúgving. Sostatt er ikki longur møguligt at taka eina útbúgving, sum beinleiðis gevur heitið “bókavørður”, men heitið bókavørður kann framvegis verða brúkt um starvsfólk við hægri bókasavnsfakligari útbúgving.

Í galdandi lóggávu kann landsstýrismaðurin sambært § 12, stk. 2 gera frávik frá ásetingini um, at leiðarin skal vera útbúgvin bókavørður. Ásetingin um frávik verður strikað, og í staðin verður sett sum treyt sambært stk. 3, at eitt fólkabókasavn, ið ikki hevur starvsfólk við hægri bókasavnsfakligari útbúgving, skal gera avtalu um samstarv við fólkabókasavn, ið hevur starvsfólk við hægri bóksavnsfakligari útbúgving í starvi. Orsøkin til treytina er, at viðkomandi faklig útbúgving er neyðug fyri at eitt bókasavn kann veita nøktandi bókasavnstænastur.

Ásett er eisini, at kommunur, sum ikki hava egið bókasavn, kunnu gera avtalu við aðra kommunu um at veita fólkabókasavnstænastu. Treytin er tó, at fólkabókasavnið, ið avtala er gjørd við, hevur starvsfólk, við hægri bókasavnsfakligari útbúgving í starvi. Tað vil siga, at kommunur kunnu samstarva um eitt væl útbygt fólkabókasavn.

Kommunur kunnu eisini samstarva um at seta starvsfólk við hægri bókasavnsfakligari útbúgving so at viðkomandi starvsfólk røkir bókasavnstænastuna á fólkabókasøvnum í fleiri kommunum. Eisini ber tað til hjá kommunum at gera avtalu við eitt fólkabókasavn í aðrari kommunu um veitan av fólkabókasavnstænastu. Treytin er tá, at fólkabókasavnið, ið avtala verður gjørd við, hevur fólk við bókasavnsfakligari útbúgving í starvi. Eitt nú virkar ein bókavørður á Klaksvíkar bókasavni eisini sum bókavørður á bókasavninum í Sunda kommunu.

Ásetingarnar í stk. 4-6 um bókasavnsnevnd, felags høli og viðtøkur eru óbroyttar í mun til galdandi lóggávu.

Stk. 7 ásetur, at landsstýrismaðurin kann veita kommununum stuðul til rakstur av fólkabókasøvnum. Í mun til galdandi lóggávu, har stuðulin verður latin eftir umsókn, ið Landsbókasavnið skal góðkenna, verður stuðulin býttur eftir fólkatalinum í kommununi. Stuðul verður eisini latin kommunum, sum í dag ikki hava fólkabókasøvn, men sum sambært lógaruppskotinum skulu veita fólkabókasavnstænastu við antin at seta á stovn egið fólkabókasavn ella við at gera avtalu við aðra kommunu um veitan av fólkabókasavnstænastu.

Stuðulin skal brúkast til útreiðslur í sambandi við at seta á stovn og reka fólkabókasavnstænastu.

Í stk. 8 verður ásett, at landsstýrismaðurin ger nærri reglur um stuðulin og setur treytir fyri býtið av stuðlinum, harundir, hvussu stuðulin verður rindaður, hvat stuðulin kann brúkast til, og hvussu eftirlitið er við stuðlinum.

Stk. 9 heimilar landsstýrismanninum at geva kommunum og stovnum boð um skyldurnar í stk. 1-6.

**Til § 7**
Í galdandi lóggávu er í § 15 ásett, at bókasøvn, sum hava meira enn 10.000 bøkur, skulu hava egin bókasavnshøli. Henda áseting er strikað, og í staðin hevur § 7 áseting um, at fólkabókasøvn skulu hava høli, sum hóska seg til bókasavnsvirksemi. Landsbókasavnið ráðgevur fólkabókasøvnum viðvíkjandi innrætting av hølum. At hølini eru hóskandi merkir eitt

nú, at ljóð- og ljósviðurskifti eru nøktandi og hølini eru innrættað soleiðis, at tey í mestan mun taka atlit til ymsu brúkararnar og teirra tørv.

Stuðulin til bygging, umbygging og keyp av bókasavnshølum verður tikin av. Síðani 2005 er stuðul bert veittur til bygging og umbygging av bókasøvnum við Gøtugjógv og á Sandi.

**Til § 8**
Ásetingarnar um samstarv við dagstovnar og aðrar stovnar, sum í galdandi lóggávu eru orðaðar í § 12, eru umorðaðar í hesi grein. Í staðin fyri áseting um, at avtalur skulu gerast millum stovnar, verður dentur lagdur á samstarv millum fólkabókasøvn og viðkomandi stovnar. Eitt nú kann talan vera um, at dagstovnar regluliga koma á vitjan á fólkabókasavninum ella talan kann vera, at fólkabókasavnið veitir útlán av bókum til ellisheim.

**Til § 9**
Greinin ásetur reglur um tænastur og tænastustøðið á fólkabókasøvnum. Bókasavnstænastur fevna um lán og atgongd til tilfar, eisini talgilt tilfar umvegis internetið, í eitt avmarkað tíðarskeið, sum bókasavnið ásetur, sum oftast ein mánaða.

Fólkabókasøvn kunnu taka gjald fyri aðrar tænastur, so sum ljóstøk og postgjald, eins og tey kunnu taka gjald fyri lánt tilfar, ið ikki verður latið inn aftur rættstundis ella als ikki verður latið inn aftur.

**Til § 10**
Ásetingin í § 10 er nýggj, hóast bókasavnssamstarvið ikki er tað. Við ásetingini verður kravt, at fólkabókasøvn skulu taka lut í bókasavnssamstarvinum fyri fólkabókasøvn, sum Landsbókasavnið skipar fyri, og sum fevnir um kunning, skeiðsvirksemi og annað. Bókasavnssamstarvið er eisini ein pallur, har bókasøvn kunnu samskifta sínámillum um samstarv og menning av bókasavnstænastum.

**Til § 11**
Í galdandi bókasavnslóg er ásett, at skúlabókasøvn skulu vera í øllum skúlum við í minsta lagi trimum samanhangandi árgangum. Ásetingin er grundað á áseting í fólkaskúlalógini um at fólkaskúlar skulu hava minst 3 floksstig. Hetta verður við ásetingini broytt til, at skúlabókasøvn skulu vera í øllum skúlum, sum eru alment fíggjaðir, eisini privatskúlum, eftirskúlum og serskúlum. Ásetingin um, at skúlabókasøvnini eru liður í skúlans virksemi, hevur við sær, at bókasøvnini í einstøku skúlunum verða tillagað tørvin á viðkomandi skúla. Hugtakið "skúlar" umfatar, í hesum sambandi, ikki hægri útbúgvingarstovnar.

Ásetingarnar í stk. 3 og 4 eru nýggjar og eru grundaðar á yvirlýsing um skúlabókasøvn hjá IFLA/UNESCO. Sambært yvirlýsingini hava skúlabókasøvn ein týðandi leiklut í mun til menning av lesi- og skrivførleikum, informatiónskompetansu, undirvísing, innlæring og mentan og eru harvið ein integreraðum partur av útbúgvingartilgongdini. Skúlabókasøvn eru við til at menna hugsjónir, hugflog og innlivingarevni, sum er grundleggjandi fyri ábyrgdarfullari luttøku í samfelagnum.

Í stk. 5 er ásett, at Landsbókasavnið ráðgevur og vegleiðir um skúlabókasøvn. Ráðgevingin fevnir um bókasavnsfakliga ráðgeving, um val av tilfari eins og innrætting av skúlabókasøvnum. Ráðgevingin snýr seg eisini um skráseting, um brúk av bókasavnskipanum og um ráðgeving í sambandi við útbúgving av skúlabókavørðum.

**Til § 12**
Ásett verður, at skúlabókasøvn í fólkaskúlanum verða skipað sambært reglunum í løgtingslóg nr. 125 frá 20 juni 1997 um fólkaskúlan, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 52 frá 7. mai 2019 (fólkaskúlalógini). Reglurnar um skúlabókasøvn í fólkaskúlanum eru ásettar í § 23 í fólkaskúlalógini. Ásetingin um fólkabókasøvn og skúlabókasøvn í felags høli er óbroytt, men er flutt til § 6 stk. 5.

**Til § 13**
Skúlabókasøvnini á miðnámsskúlum, yrkisskúlum eru týðandi liðir í undirvísingartilboðnum.
Ásett verður, at skúlabókasøvn skulu vera í øllum skúlum, sum bjóða undirvísingartilboð við almennum stuðli, harundir skúlar, ið eru skipaðir sambært løgtingslóg nr. 62 frá 15. mai 2012 um gymnasialar miðnámsútbúgvingar, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 140 frá 18. desember 2015, løgtingslóg nr. 94 frá 29. desember 1998 um yrkisútbúgvingar, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 29 frá 30. apríl 2015 og løgtingslóg nr. 42 frá 26. apríl 2019 um heilsuhjálparaútbúgving, heilsurøktaraútbúgving og námsfrøðiliga hjálparaútbúgving.

**Til § 14**
Ásetingin er nýggj. Galdandi løgtingslóg um frískúlar hevur onga áseting um skúlabókasøvn, men ásett er, at frískúlin skal vera ein fakligur og námsfrøðiligur valmøguleiki í mun til almenna skúlan.

Ásett verður, at frískúlar, sbrt. løgtingslóg nr. 46 frá 26. mars 2002 um frískúlar (frískúlalógini), sum broytt við løgtingslóg nr. 90 frá 9. juni 2020, og eftirskúlar, sbrt. løgtingslóg nr. 83 frá 17. mai 2000 um eftirskúlar (eftirskúlalógini) skulu hava skúlabókasøvn. Eisini verður ásett, at serskúlar, sbrt. løgtingslóg nr. 50 frá 9. mai 2005 um serskúla, sum broytt við løgtingslóg nr. 47 frá 6. mai 2016, skulu hava bókasøvn. Her verður hugsað um bókasøvn, har bókasavnstænastan er tillagað endamálið við skúlanum.

Ásetingin um at frískúlar, eftirskúlar og serskúlar skulu hava skúlabókasøvn er grundað á, at skúlabókasøvn eru týðandi liðir í menningini av einstaka næminginum, og at allir næmingar eiga at hava atgongd til eitt skúlabókasavn.

Ásett verður, at landsstýrismaðurin ger nærri reglur um skúlabókasøvn á frískúlum, eftirskúlum og serskúlum.

**Til § 15**
Ásetingin er nýggj. Ásetingin um universitetsbókasavn á Fróðskaparsetri Føroya hevur til endamáls at styrka universitetsbókasavnstænastuna á Fróðskaparsetri Føroya til gagns fyri granskarar, undirvísarar, lesandi og onnur, umframt at tryggja, at tann gransking, ið fer fram, verður skrásett, varðveitt og miðlað. Sambært § 18 í løgtingslógaruppskotinum røkir Landsbókasavnið, umframt aðrar uppgávur, eisini universitetsbókasavnsuppgávuna. Ásett verður tí, at tað er Landsbókasavnið, ið skipar universitetsbókasavnið á Fróðskaparsetri Føroya, og at avtala síðani verður gjørd um rakstur og fígging. Landsstýrismaðurin skal góðkenna avtaluna millum Fróðskaparsetur Føroya og Landsbókasavnið um rakstur av universitetsbókasavninum.

**Til § 16**
Ásetingin er nýggj. Við ásetingini verður sett sum krav, at bókasøvn skulu vera á øllum hægri útbúgvingarstovnum, og at tað er Landsbókasavnið, sum røkir uppgávuna eftir at avtala er gjørd um rakstur og fígging. Lagt verður upp til, at útbúgvingarstovnurin fíggjar bókasavnið.

Vinnuháskúlin er dømi um hægri útbúgvingarstovn, ið skal gera avtalu við Landsbókasavnið um bókasavn á Vinnuháskúlanum. Landsstýrismaðurin skal góðkenna avtaluna.

**Til § 17**
Innihaldsliga er talan um somu ásetingar sum í kapitli II í galdandi lóggávu um Føroya Landsbókasavn. Í § 17 stk. 1 verður lagt afturat, at uppgávan sum tjóðbókasavn fevnir um bæði prentað og talgilt tilfar. Talgilt tilfar fevnir um tilfar, ið verður givið út sum ljóðbøkur, e-bøkur og onnur verk, sum eru útgivin talgilt, sum nærri lýst í fylgiskjali 1 til kunngerð um skylduavhending. Innsavningin hjá Landsbókasavninum fevnir eisini um føroyskar heimasíður.

Í galdandi lóg er ásett, at endamálið hjá Landsbókasavninum er at savna, skráseta og varðveita allar føroyskar bókmentir, og alt sum er skrivað av bókmentum um Føroyar og av føroyingum. Talan er um bøkur, tíðarrit, ljóðbøkur, talgilt og teldutøkt tilfar, tónleik, film og annað av-tilfar. Talan er sostatt um sera víðfevndar uppgávur, sum eru vaksnar nógv í vavi seinastu árini, við tað, at nógv meiri verður givið út av bæði bókum, ljóðbókum, tónleiki, filmi og øðrum. Afturat ásetingini um handrit o.a. eftir føroyskar høvundar verður lagt áseting um tónleikasøgu og filmssøgu, sum ikki er tilskilað í galdandi lóggávu.

Ásetingin í stk. 2 vísir til ta gransking, ið Landsbókasavnið skal fremja og skipa fyri á stovninum. Talan er um gransking í teimum samlingum, sum eru til taks á stovninum, og talan kann bæði vera um gransking, ið starvsfólk á Landsbókasavninum fremja, og gransking, ið onnur fremja í samlingunum á Landsbókasavninum.

Ásetingin í stk. 3 um at Landsbókasavnið stendur fyri menning á bókasavnsøkinum er nýggj og vísir til, at Landsbókasavnið sum tjóðbókasavn skal skipa fyri menning á bókasavnsøkinum sum heild. Hetta verður gjørt við støði í teirri vitan, sum Landsbókasavnið hevur um bókasavnsøkið, eitt nú vitan, sum verður fingin til vegar gjøgnum norðurlendskt og altjóða samstarv, eitt nú við limaskapi í IFLA (International Federation of Library Associations and Institutitions).

**Til § 18**
Ásetingin skipar Landsbókasavnið sum universitetsbókasavn og nágreinar uppgávuna hjá Landsbókasavninum at menna universitetsbókasavnstænastuna og stuðla undir gransking og undirvísing og skipa fyri skeiðsvirksemi. Hetta hevur við sær, at Landsbókasavnið skal leggja seg eftir at menna førleikarnar á stovninum at veita universitetsbókasavnstænastu. Ásetingin tilskilar, at Landsbókasavnið skal veita atgongd til lesistovu, lesiklivar og tekniska útgerð, ið stuðlar undir lestri og gransking.
Ásetingin skal tryggja, at Landsbókasavnið kann veita Fróðskaparsetri Føroya og øðrum hægri útbúgvingarstovnum eina nøktandi tænastu.

**Til § 19**
Í galdandi lóggávu er ásett í § 1, stk. 8, at endamálið hjá Landsbókasavninum er, í samstarvi við Fróðskaparsetur Føroya og aðrar vísindaligar stovnar, at veita vísindabókasavnstænastu. Ásetingin um universitetsbókasavnstænastur er flutt í § 18, meðan henda greinin snýr seg um vísindabókasavnstænastur til granskingarstovnar, bæði almennar og privatar, eitt nú umvegis e-feingi.

**Til § 20**

Høvuðsbókasavnstænastan hjá Landsbókasavninum vendir sær til fólkabókasøvn. Ásetingin í § 20, stk. 2 er nýggj. Endamálið er at loyva, at Landsbókasavnið útveitir partar av høvuðsbókasavnstænastuni við nærri ásettum treytum. Eitt nú er neyðugt, at viðkomandi bókasavn, ið átekur sær partar av høvuðsbókasavnsuppgávuni, hevur somu bókasavnsskipan sum Landsbókasavnið. Talan kann eitt nú verða um, at eitt fólkabókasavn eftir avtalu átekur sær uppgávuna at keypa inn og klárgera tilfar til øll fólka- og skúlabókasøvn.

**Til § 21**
Vísandi til ásetingarnar um høvuðsbókasavnstænastu í § 20 í uppskotinum, er tað, sum meginregla, Landsbókasavnið, ella fólkabókasavnið, ið eftir avtalu veitir høvuðsbókasavnstænastu, ið bíleggur nýtt bókasavnstilfar. Einstøku bókasøvnini keypa síðani tilfarið frá Landsbókasavninum ella viðkomandi fólkabókasavni.

Í stk. 2 verður ásett, at Landsbókasavnið kann reka ávíst inntøkufíggjað virksemi, og taka gjald fyri ymsar tænastur, ið Landsbókasavnið veitir almennum stovnum, privatum stovnum, granskarum o.ø. Talan er um virksemi, sum Landsbókasavnið skipar fyri, eitt nú skeiðsvirksemi fyri bókasøvnunum kring landið. Talan kann eisini vera um skipan av bókasøvnum á privatum og almennum stovnum.

Talan er annars partvís um sama innihald sum í § 21 í galdandi bókasavnslóg. Tó er heitið "bókastova" strikað, og ásetingin um, at bókastovan er skipað sum deild á Landsbókasavninum, undir leiðslu av deildarleiðara, er somuleiðis strikað.

**Til § 22**
Ásetingin er ein dagføring av ásetingini um bókasavnsgjald, sum í galdandi lóggávu er áløgd bókastovuni sambært § 21, pkt. 5 og § 21, stk. 2. Umorðingin snýr seg um at talgildar bøkur, so sum e-bøkur og ljóðbøkur, verða tilskilaðar í ásetingini. Ásetingin fevnir eisini um annað tilfar, so sum listaverk, sum eru til láns á bókasøvnunum.

Ásetingin um, at landsstýrismaðurin árliga ger av, hvussu stórur partur av bókasavnsgjaldinum verður settur av til talgildar útgávur, er nýggj. Ásetingin tryggjar, at talgildar útgávur verða taldar við í uppgerðini av bókasavnsgjaldinum.

Í stk. 2 verður ásett, at eftirlivandi hjúnafelagi bert varðveitir rættin til bókasavngjald, um viðkomandi hevur fingið bókasavnsgjald útgoldið áðrenn 1. januar 2023. Tað vil siga, at eftir 31. desember 2022, verður bókasavnsgjald ikki útgoldið til eftirlivandi hjúnafelaga, ið ikki hevur fingið útgoldið bókasavnsgjald áður.

Ásetingin í stk. 3 heimilar landsstýrismanninum at gera av, at bókasavnsgjald, sum er minni enn kr. 500, ikki verður útgoldið. Ásetingin hevur ikki stórvegis broyting við sær í mun til galdandi ásetingar í kunngerð um, at bókasavnsgjald bert verður goldið teimum høvundum, ið hava 50 ella fleiri eintøk av teirra verkum tøkar á bókasøvnunum. Eins og áður verður ein upphædd, ið er ov lág til at verða útgoldin, løgd afturat samlaða bókasavnsgjaldinum, ið verður goldið út til allar móttakarar av bókasavnsgjaldi.

Heimilað verður landsstýrismanninum at áseta reglur fyri býtið av bókasavnsgjaldinum, herundir hvussu stórur partur av bókasavnsgjaldinum fer til fysisk verk, og hvussu stórur partur fer til talgild verk. Heimilað verður eisini landsstýrismanninum at áseta reglur um treytir fyri at móttaka bókasavnsgjald, eitt nú kann landsstýrismaðurin áseta, at móttakarar skulu søkja um at fáa bókasavnsgjald. Ásetingin er gjørd við tí endamáli at lætta um uppsøkjandi arbeiðið hjá

Landsbókasavninum, tí tað kann vera trupult at finna fram til røttu móttakararnar av bókasavnsgjaldinum.

Við nýggju ásetingini um at bókasavnsgjaldið eisini fevnir um talgild verk, verða ljóðbøkur, sum eftir ætlan verða atkomuligar á netinum í seinasta lagi 1. januar 2023, taldar við. Av tí at talan ikki er um eintøk, ið standa á hillunum á bókasøvnunum, men um talgildar fílar, ið lánarar lurta eftir, so má bókasavnsgjaldið fyri talgild verk uppgerast á ein øðrvísi hátt. Bókasavnsgjaldið fyri prentaðar bøkur verður gjørt upp sum tal av bókum, ið eru til taks á bókasøvnunum. Ætlanin er, at bókasavnsgjaldið fyri talgildar bøkur verður gjørt upp við at telja, hvussu nógv útlán hava verið av bókini, og at landsstýrismaðurin ásetur nærri reglur hesum viðvíkjandi.

Í løtuni fyriliggur eingin ætlan um, at tónleikur og filmur skal kunna lánast á netinum umvegis bókasøvnini, men ynskiligt er, at føroyskur tónleikur og filmur við tíðini eisini verður atkomuligur á netinum umvegis bókasøvnini.

**Til § 23**
Við ásetingini verður tilskilað, at tað áliggur Landsbókasavninum at útvega ljóðbøkur og annað tilfar til teirra, ið ikki fáa lisið prentaðan ella talgildan tekst. Í galdandi lóg er líknandi áseting í § 22, har tað áliggur bókastovuni á Landsbókaasavninum at útvega ljóðbøkur og annað tilfar.

Við ásetingini verður heimilað Landsbókasavninum at framleiða ljóðbøkur og annað tilfar til endamálið, sum ásett er í § 17, stk. 3 í løgtingslóg um upphavsrætt, í tann mun onnur ikki hava framleitt ella hava í umbúnað at framleiða nevnda tilfar.

**Til § 24**
Ljóðbókatænastan, sum í 2017 gjørdist partur av Landsbókasavninum, hevur givið út meginpartin av teimum ljóðbókum, sum eru komnar á føroyskum. Føroyski ljóðbókamarknaðurin er lítil, og tað er fíggjarliga tungt hjá forløgum at geva út ljóðbøkur. Ljóðbøkurnar, sum Ljóðbókatænastan, og frá 2017 Landsbókasavnið, hava givið út, eru sambært galdandi lóggávu givnar út til teirra, sum av eini ella aðrari orsøk ikki fáa lisið ella á annan hátt ognað sær vanligan prentaðan tekst.

Seinnu árini eru ljóðbøkur vorðnar alt meiri brúktar, eisini av fólkum, ið ikki hava lesitarn.

Fyri at almenningurin kann fáa gagn av teimum ljóðbókum, ið eru og verða framleiddar til málbólkin í § 17, stk. 3 í løgtingslóg um upphavsrætt, sum eru tey, ið hava lesitarn, er í lógaruppskotinum ásett, at Landsbókasavnið kann selja upprunafílur til ljóðbøkur og annað tilfar til rættindahavarar, við útgávu til almenningin fyri eyga.

Landsbókasavnið kann selja ljóðbókina ella annað tilfar, ið er framleitt sambært § 23, til forløg, ið hava útvegað sær rættindi til útgávu av ljóðbókini ella øðrum tilfari. Søluprísurin er kostnaðurin, ið Landsbókasavnið hevur rindað fyri framleiðslu av ljóðbókini ella øðrum tilfari, og hann verður rindaður, so hvørt forløgini fáa inntøkur av útgávuni. Á hvørjum ári verða 50 % av inntøkunum fyri einstøku ljóðbókina ella annað tilfar rindað sum avdráttur av kostnaðinum fyri framleiðsluna. Avdrátturin verður rindaður árliga til Landsbókasavnið. Avdráttur av kostnaðinum fyri framleiðslu av hvørjari ljóðbók verður í mesta lagi rindaður í 10 ár, treytað av, at ljóðbókin er tøk til almenningin umvegis bókasøvninini á teimum talgildu pallunum, ið eru tøkir til endamálið. Tá framleiðslukostnaðurin er rindaður, ella tá avdráttur er rindaður í 10 ár, hava forløgini onga aðra skyldu mótvegis Landsbókasavninum. Møguligur

framleiðslukostnaður, ið ikki er rindaður innanfyri 10 ára tíðarskeiðið, verður avskrivaður. Avdrátturin er avmarkaðaður til 10 ár fyri at umsitingin hjá forløgum og Landsbókasavninum ikki verður órímiliga drúgv í mun til eina ljóðbók, ið fíggjarliga ikki kastar nóg nógv av sær til at dekka framleiðslukostnaðin.

Í serligum førum, tá einki forlag er sinnað at geva út ljóðbók ella annað tilfar, ið Landsbókasavnið hevur framleitt, og Landsbókasavnið heldur tað vera gagnligt fyri almenningin, at ljóðbókin ella annað tilfar kemur út til almenningin, kann Landsbókasavnið geva ljóðbókina ella annað tilfar út til almenningin. Tá skal avtala við rættindahavarar tó fyriliggja.

**Til § 25**
Í mun til galdandi lóggávu er kapittulin um avhending av skyldueintøkum dagførdur, við tað at tilskilað verður, at skylduavhendingin fevnir bæði um fysisk verk og talgild verk. Í ásetingini verður skylduavhending lýst sum grundarlag undir innsamling og varðveiting av tí partinum av mentanararvinum, sum er givin út, bæði í fysiskum og talgildum líki. Skylduavhendingin er sostatt eisini grundarlag undir arbeiðinum hjá Landsbókasavninum sum tjóðbókasavn sambært § 17.

**Til § 26**
Ásetingin er ein dagføring av § 24, stk. 3 í galdandi lóg og tilskilar, at skylduavhending fevnir um øll verk, ið verða givin út í Føroyum ella útgivin uttanlands við útbreiðslu í Føroyum fyri eyga, og at talan bæði er um fysisk verk og talgild verk. Eisini verður tilskilað, at eitt verk er givið út, tá upphavsmaður hevur givið samtykki til, at eintøk av verkinum verða boðin til sølu ella á annan hátt spjadd alment.

**Til § 27**
Ásetingin er ein dagføring av § 24, stk. 2 í galdandi lóg og tilskilar, at eitt verk er at skilja sum ein avmarkað mongd av upplýsingum, sum er at meta sum ein liðug og sjálvstøðug eind. Afturat galdandi áseting verður tilskilað, at skyldan er galdandi uttan mun til á hvørjum miðli verkið fyriliggur, tað vil siga, at talan bæði er um fysisk verk og talgild verk á ymsum miðlum. Ásetingin í stk. 2 er nýggj og heimilar landsstýrismanninum at áseta nærri reglur fyri, hvørji verk skylduavhendingin fevnir um, og hvussu hon fer fram.

**Til § 28**
Ásetingin er nýggj. Ásetingin skal tryggja, at vísindaligar útgávur í sambandi við gransking, ið verður framd á føroyskum granskingarstovnum ella á annan hátt tengd at føroyskari gransking, eru fevndar av avhendingarskylduni og harvið verða skrásettar í føroysku tjóðbókaskránni og varðveittar á Landsbókasavninum.

**Til § 29**
Ásetingin fevnir um skylduavhending av fysiskum verkum, ið verða givin út í uppløgum, eitt nú bøkur, faldarar, plakatir og líknandi. Talan er um dagføring av pørtum av ásetingunum í § 24 í galdandi lóggávu.
Landsbókasavnið kann, í ávísum førum, gera frávik frá avhendingarskylduni, eitt nú í mun til tal av eintøkum, ið skulu avhendast, tá talan er um útgávu, sum er í fáum eintøkum.

**Til § 30**
Áseting um, hvørjum avheningarskyldan áliggur.

Ásetingin tilskilar, hvør hevur ábyrgdina av at avhenda prentað skyldueintøk til Landsbókasavnið. Í fyrsta lagi er er tað framleiðarin, tað vil siga prentsmiðjan, ið prentar eintakið. Um prentsmiðjan av einari ella aðrari orsøk ikki røkir sína avhendingarskyldu, áliggur tað útgevaranum at avhenda skyldueintøkini til Landsbókasavnið. Útgevarin er tann, sum tekur stig til útbreiðsluna av framleiddu verkunum. Tá talan er um útgávu, har eintøkini eru framleidd uttanlands, hevur innflytarin avhendingarskyldu. Ásetingin um, at tá tann, ið hevur avhendingarskylduna, doyr ella fer á húsagang, liggur avhendingarskyldan á búnum, er óbroytt í mun til galdandi lóggávu.

Ásett er, at avhendu eintøkini verða latin Landsbókasavninum ókeypis. Tað vil siga, at Landsbókasavnið hvørki rindar fyri eintøkini, umsiting í sambandi við avhendingina ella møguliga frakt.

**Til § 31**
Ásetingin fevnir um skylduavhending av talgildum verkum, bæði tilfar, ið verður givið út í Føroyum, og tilfar, ið vendir sær til fólk í Føroyum.

Avhendingarskyldan fyri talgild verk fevnir bæði um føroyskt tilfar, ið er givið út í Føroyum og tilfar, ið vendir sær til fólk í Føroyum. Endamálið er at varðveita tilfar, ið er viðkomandi fyri og ætlað fólkum í Føroyum.

Tá talan er um at framleiða eintak av talgildum tilfari, ið verður avhendað, er tað Landsbókasavnið, ið ber kostnaðin av at gera eintøk av tilfarinum.

**Til § 32**
Ásetingin tilskilar, at tað er skrásetarin av økisnavninum á internetinum, ið hevur avhendingarskylduna.

**Til § 33**
Ásett verður, at Landsbókasavnið skal hava atgongd til tilfar, ið verður skylduavhent. Tí skal Landsbókasavnið hava útvegað loyniorð og aðrar upplýsingar, ið eru neyðugar fyri at sleppa framat tilfarinum. Tann, ið hevur avhendingarskyldu kann tó krevja, at Landsbókasavnið ikki letur upplýsingar um loyniorð og aðrar upplýsingar víðari til óviðkomandi triðjamann.

**Til § 34**
Áseting um at Landsbókasavnið skal hava atgongd til at brúka tøkniliga útgerð og fáa nýtsluleiðbeining, um ein tílík er neyðug fyri at fáa atgongd til tilfar. Ásetingin er óbroytt í mun til § 25, stk. 2 í galdandi lóg.

**Til § 35**
Ásett verður, at umsitarar av økisnøvnum á internetinum, ið er tillutað Føroyum ella økisnøvnum, ið hevur tilfar, ið er ætlað fólkum í Føroyum, skulu geva Landsbókasavninum avrit av yvirlitinum yvir slík økisnøvn, umframt upplýsingar um, hvør hevur skrásett økisnøvnini. Endamálið er, at Landsbókasavnið fær goymt og skrásett tilfar, ið er viðkomandi fyri varðveiting av føroyskum mentanararvi.

**Til § 36**
Ásetingin er óbroytt í mun til § 25 í galdandi lóggávu. Ásetingin um at verk skulu avhendast í tí sniði, sum tey eru útgivin í, er óbroytt í mun til galdandi lóggávu. Ásetingin skal tryggja, at verkini verða varðveitt í tí líki, tey eru útgivin.

**Til § 37**
Ásetingin er óbroytt í mun til § 27 í galdandi lóggávu. Tó er í stk. 2 tilskilað, at útgevarin hevur skyldu at veita upplýsingar, ið eru neyðugar fyri, at verkið kann verða skrásett í tjóðbókaskránni.

**Til § 38**
Ásetingin er ábroytt í mun til § 30 í galdandi lóg. Við ásetingini verður tilskilað, at um tann, ið hevur avhendingarskylduna, doyr ella fer á húsagang, liggur avhendingarskyldan á búnum.

**Til § 39**
Í galdandi lóggávu er í § 31 ásett, at avhendingarskyldugu eintøkini skulu varðveitast í Landsbókasavninum og í øðrum bókasavni uttan fyri Tórshavn, eftir nærri áseting frá landsstýrismanninum í mentamálum. Endamálið við at varðveita skyldueintøkini á tveimum ymiskum støðum, er at økja um varðveitingartrygdina. Í viðmerkingunum til lógaruppskotið frá 2001 verður hildið, at Klaksvíkar bókasavn er væl egnað sum skyldubókasavn. Skyldubóksavn er tó ikki sett á stovn í Klaksvík. Eintøkini verða í dag varðveitt á Landsbókasavninum og í aðrari goymslu hjá Landsbókasavninum, sum er á aðrari staðseting í høvuðsstaðarøkinum.

Í mun til galdandi lóggávu verður ásetingin broytt, so at kravið, um at eintøk skulu varðveitast á bókasavni uttan fyri Tórshavn, fellur burtur. Av trygdarávum verður tó hildið fast um, at eintøk skulu goymast á Landsbókasavninum og á øðrum staði í Føroyum, sum landsstýrismaðurin góðkennir. Ásett verður, at landsstýrismaðurin ger nærri reglur fyri varðveiting av tilfarinum og atgeingi til hetta.

**Til § 40**
Ásetingin um vernd av mentanararvi er óbroytt í mun til § 4 í galdandi lóggávu.
Ásetingin skal tryggja, at bókmentalig verk ella handrit, ið verða mett at vera týðandi fyri føroyskan mentanararv, ikki verða flutt av landinum uttan við loyvi frá landsstýrismanninum.

**Til § 41**
Áseting um skilhaldsreglur. Við ásetingini verður heimilað bókasøvnum at gera skilhaldsreglur fyri bókasavnið. Skilhaldsreglurnar kunnu fevna um reglur fyri atburð og annað líknandi.

**Til § 42**
Áseting um revsing fyri brot á ásetingar i lógini.

**Til § 43**
Ásetingar um gildiskomu.

Uttanríkis- og mentamálaráðið, 10. oktober 2022.

**Jenis av Rana**
landsstýrismaður

/ Poul Geert Hansen

**Yvirlit yvir fylgiskjøl:**
Fylgiskjal 1: Bókasøvn ein mannarættur. Álit um dagføring av bókasavnslógini.
Fylgiskjal 2:
Fylgiskjal 3: